# Ársfrágreiðingin 2019

Tórshavn, juni 2019

LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

# Innihaldsyvirlit


| | | |
|---|---|---|
| I. | Um embætið | 7 |
| II. | Gongdin í 2019 | 11 |
| III. | Hagtøl | 14 |
| IV. | Álit | 35 |
| V. | Frágreiðingar | 51 |
| VI. | Onnur viðgerð og hjálp til borgarar | 55 |
| VII. | Avvístar klagur | 59 |
| VIII. | Grein 20: í Barnarættindasáttmálanum – Barnsins rættur til umsorgan í fosturheimi og á stovni | 65 |
| IX. | Grein: Vegleiðing | 71 |
| X. | Grein: Skjalainnlit í dátugrunnar | 77 |
| XI. | Grein: Notatskylda | 81 |
| XII. | Skjøl | 87 |



Løgtingsins umboðsmaður
Ársfrágreiðingin 2019


© 2019 Løgtingsins umboðsmaður


Myndir: Miriam & Janus Photography, Beinta á Torkilsheyggi, Elinborg Apol, Heini Petersen og Sólja í Ólavsstovu

Umbrotið, prentað og heft: Føroyaprent
ISBN 978-99918-854-8-3

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

# Til Løgtingið

Vísandi til § 11, stk. 1 í løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann lati eg av hondum hesa frágreiðing um virksemi mítt í 2019.

Ársfrágreiðingin skal sambært nevndu grein verða almannakunngjørd áðrenn 1. juli 2020.

Tórshavn, juni 2020

*Sólja í Ólavsstovu*



# I Um embætið

Sambært § 1 í løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann velur Løgtingið fyri eitt 5 – ára skeið ein uttantingsmann at hava eftirlit við fyrisiting heimastýrisins. Tann 2. desember 2015 legði løgtingsformaðurin uppskot fyri Løgtingið at velja meg aftur sum umboðsmann fyri eitt 5 ára skeið frá 1. januar 2016 til 1. januar 2021. Eg tók við embætinum á fyrsta sinni tann 1. januar 2006. Umframt meg sjálva hevur embætið verið mannað við løgfrøðiligu medarbeiðarunum mínum, Elinborg Apol, Gurið Joensen, Heina Petersen, sum avloysti Jóhannu Arge og Fríðu S. Berg, skrivstovuleiðara, sum avloysti Jette Eirikstoft.

Við løgtingslóg kunnu verða gjørdar almennar reglur fyri virksemi umboðsmansins, sum annars í sínum starvi er óheftur av Løgtinginum (§ 3).

Virksemið umboðsmansins fevnir um alla fyrisiting heimastýrisins, t.e. bæði landsins og ta kommunalu (§ 4, stk. 1). Eisini feløg, stovnar, felagsskapir v.m., ið verða roknað við til almennu fyrisitingina sambært fyrisitingarlógini, eru fevndir av virksemi umboðsmansins (§ 4, stk. 2). Harumframt eru interkommunalir felagsskapir undirlagdir virksemið umboðsmansins (§ 4, stk. 4). Harafturímóti fevnir virksemi hansara ikki um ríkismyndugleikar, Løgtingið og stovnar undir Løgtinginum (§ 4, stk. 5).

Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at tær umsitingareindir, sum eru fevndar av virksemi hansara, ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti borgaranum (§ 5). Ein og hvør kann senda umboðsmanninum klagu um tær í § 4 nevndu umsitingareindir, sum eru fevndar av virksemi hansara (§ 6, stk. 1). Klagarin skal navngeva seg í klaguni, og skal hon vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað (§ 6, stk. 2). Er talan um avgerðir, sum kunnu leggjast fyri hægri umsitingarmyndugleika, skal hesin møguleiki vera royndur fyrst, áðrenn klagað verður til umboðsmannin (§ 6, stk. 3). Eru hesar treytir loknar, tekur umboðsmaðurin støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í tí máli, ið klagað verður um (§ 6, stk. 4). Umboðsmaðurin kann eisini sjálvur av sínum eintingum taka eitt mál til viðgerðar og fremja neyðugar kanningar í hesum sambandi (§ 6, stk. 5). Tær í § 4 nevndu umsitingar hava skyldu at geva umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram øll tey skjøl, sum hesin embætisins vegna krevur at fáa fyrilagt. Umboðsmaðurin hevur rætt til at vitja øll tey støð, ið kannað verða, og hann hevur fría atgongd til at gera kanningar í øllum neyðugum hølum. Hann kann eisini stevna fólki í rættin at vitna um viðurskifti, ið eru avgerandi í kanningararbeiðinum (§ 8).

Tá umboðsmaðurin er liðugur við sínar kanningar, ger hann sína niðurstøðu, og metir hann, at álvarsligt mistak ella vansketni er framt, skal hann boða formansskapi Løgtingsins, løgmanni og viðkomandi landsstýrismanni og/ella kommunustýri frá hesum. Hann hevur rætt til alment at finnast at, koma við tilmælum og á annan hátt gera vart við meting sína av einum máli, hann hevur kannað. Hann kann eisini mæla viðkomandi myndugleikum til, at fríur rættargangur verður givin (§ 10). Rakar umboðsmaðurin við lýti í galdandi lógum, fyriskipanum ella umsitingarligum avgerðum, skal hann boða Løgtingi og viðkomandi landsstýrismanni frá hesum, og er talan um kommunal ella interkommunal viðurskifti, skal hann eisini boða viðkomandi kommunustýri frá (§ 12).

Ein samandráttur av nøkrum av niðurstøðum umboðsmansins og eru tiknar við í ársfrágreiðingina. Álitini eru at finna í síni fullu longd á heimasíðu umboðsmansins www.lum.fo

Lógin og ein vegleiðing um, hvussu ein kann klaga til Løgtingsins umboðsmann, eru viðheft ársfrágreiðingini sum skjøl.

Adressan er:

Løgtingsins umboðsmaður
undir Bryggjubakka 11
Postsmoga 2008, FO-110 Tórshavn
teldupostadressa: lum@lum.fo
Heimasíða: www.lum.fo



# II Gongdin í 2019

Í 2019 fekk umboðsmaðurin 72 klagur. Av hesum 72 klagunum vóru 59 endaliga avgreiddar innan 31. desember. Harumframt vóru avgreiddar 18 klagur frá undanfarnu árum. Umframt tær ítøkiligu klagur, sum umboðsmaðurin fekk í 2019 tók umboðsmaðurin 2 mál upp av egnum ávum. Av hesum slagi av málum varð 1 mál endaliga avgreidd við árslok, umframt vórðu 2 mál avgreidd frá undanfarnu árum.

Talið av klagum er lægri enn í 2018, men meira ájavnt talinum av klagunum tey undanfarnu árini.

Av klagunum, sum vóru avgreiddar í 2019, endaðu 18 við áliti, 48 klagur endaðu við einari aðrari viðgerð enn áliti, meðan 11 klagur vórðu avvístar.

Ein av uppgávunum hjá umboðsmanninum er at vegleiða og upplýsa um virksemið hjá stovninum. Við at greiða frá árliga virkseminum og skriva greinar um viðkomandi evnir, er tað gjørligt hjá Løgtinginum og øðrum áhugaðum at fylgja við í virkseminum hjá umboðsmanninum og fáa kunnleika til, hvussu ymisk mál og løgfrøðiligir spurningar verða viðgjørdar.

Í hesi ársfrágreiðing kunnu lesast stuttar frásagnir av ymiskum málum, sum umboðsmaðurin hevur viðgjørt í 2019. Álit og frágreiðingar eru at finna í síni fullu longd á heimasíðuni hjá umboðsmanninum www.lum.fo

Í ársfrágreiðingini kunnu somuleiðis lesast greinar, sum lýsa ymisk viðurskifti, sum kunnu hava almennan áhugað. Í hesi ársfrágreiðing eru fýra greinar:

Í fyrstu greinini verður barnsins rættur til umsorgan í fosturheimi og á stovni umrøddur. Sum tað framgongur í greinini gevur Barnarættindasáttmálin einum barni, sum myndugleikin hevur yvirtikið umsorganina fyri, og sum býr í fosturheimi ella á stovni, týdningarmikil rættindi. Barnið hevur rætt til umsorgan og rætt til at menna seg væl við útgangsstøði í tørvinum hjá barninum. Barnið skal hoyrast í øllum viðurskiftum, sum hevur við tað at gera, og hevur rætt til at verða vart móti øllum slagi av harðskapi og ágangi. Setan av barninum í fosturheim skal taka atlit at mentan og framhaldi í uppalingini av barninum, men tá alt kemur til alt, skal barnsins tørvur setast fremst. Viðurskiftini skulu leggjast soleiðis til rættis, at barnið fær ta umsorgan, sum er neyðug, fyri at tað trívist og mennist, antin tað verður sett í fosturheim ella á stovn. Góðar skipanir mugu vera fyri eftirlit við hesum, m.a. skipanir har børn hava møguleika fyri at siga frá. Børn skulu hoyrast bæði í sambandi við val av fosturheimi og stovni og eisini aftaná.











Í næstu greinini verður vegleiðingarskyldan hjá almennum myndugleikum viðgjørd. Sambært greinini hava myndugleikar skyldu til at vegleiða borgarum, sum venda sær til myndugleikan. Hóast henda skylda bert er galdandi, tá borgarin sjálvur vendir sær til myndugleikan, er skyldan eisini galdandi í støðum, har borgarin ikki beinleiðis spyr myndugleikan, men har tað vildi verið natúrligt og viðkomandi at vegleitt borgaran, tí tað tyktist sum borgarin ikki kennir síni rættindi. Um borgari hevur biðið um vegleiðing, skal myndugleikin ikki avmarkað vegleiðingina til júst tann spurning, ið borgarin hevur sett, men skal vegleiða um tey viðurskifti, ið eru viðkomandi fyri málið.

Hvat er eitt skjal, sum er fevnt av § 5, stk. 1 í innlitslógini verður viðgjørt í triðju greinini, Skjalainnlit í dátugrunnar. Í greinini sæst m.a. at skjalahugtakið fevnir bæði um skjøl úr pappíri og skjøl, ið eru elektronisk. Teldupostar eru í hesum høpi sum meginregla at meta sum meinlík elektroniskum skjølum. Finst skjalið einans í elektroniskari útgávu, hevur myndugleikin skyldu at gera skjalið tøkniliga atkomuligt hjá tí, ið biðið hevur um innlit. Hetta kann eitt nú gerast soleiðis, at myndugleikin ger eitt útprent av skjalinum, ella at viðkomandi fær møguleika at síggja elektroniska skjalið á einum telduskermi á staðnum. Við støði í skjalahugtakinum ber til at siga, at tá rætturin til skjalainnlit fevnir um pappírsskjøl, goymd í einum vanligum skjalasavni, fevnir rætturin eisini um samanberandi elektronisk skjøl, ið eru goymd í einum dátugrunni. Tað hevur sostatt ikki týdning fyri rættin til skjalainnlit, hvussu skjøl og upplýsingar eru skapað, ella hvussu tey eru goymd, men heldur at tey kunnu rúmast í skjalahugtakinum.

Í síðstu greinini verður notatskyldan hjá almennum myndugleikum viðgjørd. Hendan skyldan áleggur m.a. einum myndugleika at skriva upp innihaldið í øllum upplýsingum, sum hava týdning fyri málsviðgerðina og málsgongdina í einum máli. Myndugleikin skal somuleiðis lýsa málið á nøktandi hátt, áðrenn avgerð verður tikin. Í tann mun ein fyrisitingarmyndugleiki ikki heldur notatskylduna, kann hetta eftir umstøðunum hava týdning fyri at prógva grundarlagið undir avgerðini. Tað kann soleiðis verða torført hjá myndugleikanum at lyfta próvbyrðuna fyri, at ein avgerð er saklig og í samsvari við fyrisitingarrættin. Úrslitið av hesum kann verða, at eftirlitsmyndugleikin antin ógildar avgerðina ella heitir á myndugleikan um at taka málið upp til nýggja viðgerð.

Á hvørjum ári skipa teir norðurlensku barnaumboðsmenninir fyri fundi sína millum at umrøða felags áhugamál. Tann 21. – 23. mai luttók umboðsmaðurin saman við einum av sínum starvsfólkum á Barnaumboðsmannafundi í Reykjavík.

Umboðsmenninir í Vestnorði t.e. Noregi, Danmark, Íslandi, Grønlandi og Føroyum koma regluliga saman til fundar eina ella tvær ferðir um árið, har evni av felags áhuga koma til viðgerðar. Í døgunum 25. – 27. juni var umboðsmaðurin vertur fyri einum slíkum fundi í Skálavík.

# III Hagtøl

**Klagur innkomnar í 2019 býttar á myndugleikar**

Í 2019 komu inn 72 klagur
Hesar klagur vóru býttar soleiðis millum ymisku myndugleikarnar:

Talva 1




**Klagur innkomnar í 2019 býttar á myndugleikar**

Talva 1

| Myndugleiki | Klagur |
|---|---|
| Almannaverkið | 8 |
| Arbeiðs- og brunaeftirlitið | 2 |
| Barnaverndartænastur | 10 |
| Búnaðarstovan | 1 |
| Familjufyrisitingin | 1 |
| Fíggjarmálaráðið | 1 |
| Fiskimálaráðið | 1 |
| Føroya Kærustovnur | 5 |
| Havnar arbeiðskvinnufelag | 1 |
| Heilsu- og innlendismálaráðið | 1 |
| Heilsutrygd | 3 |
| Landssjúkrahúsið | 3 |
| Kommunala eftirlitið | 1 |
| Kommunur | 18 |
| Landsbankin | 1 |
| Landsverk | 1 |
| Løgmansskrivstovan | 2 |
| Mentamálaráðið | 2 |
| Privat | 1 |
| Samferðslumálaráðið | 1 |
| Skúlar | 1 |
| Taks | 2 |
| Trygdargrunnur Fiskivinnunar | 2 |
| Uttanríkis- og Vinnumálaráðið | 2 |
| Økistænastur | 1 |
| **Tilsamans** | **72** |

## Innkomnar klagur í 2019 býttar á málsøki og klaguinnihald

Talva 2




## Innkomnar klagur í 2018 býttar á málsøki og klaguinnihald

Talva 2

| Málsøki | Tal av klagum | Klagur um avgerðir og grundgeving | Klagur um málsviðgerð og málsvið-gerðartíð | Klagur um atburð o.a. | Gegni |
|---|---|---|---|---|---|
| Almannamál | 7 | 1 | 6 | | |
| Arbeiðsmarknaðarmál | 4 | 1 | 3 | | |
| Barnaverndarmál | 10 | 2 | 7 | | 1 |
| Búnaðarmál, byggimál, ognartøka og umhvørvismál | 14 | 2 | 11 | 1 | |
| Børn og ung | 3 | 1 | 2 | | |
| Fiskivinnumál | 1 | 1 | | | |
| Heilsumál | 3 | 1 | 2 | | |
| Innlit, gegni v.m. | 11 | 5 | 6 | | |
| Kommunumál | 2 | 1 | 1 | | |
| Skattur v.m. | 2 | | 2 | | |
| Skúlamál | 1 | | 1 | | |
| Starvsfólkamál | 11 | 7 | 4 | | |
| Ymiskt | 3 | | 3 | | |
| **Tilsamans** | **72** | **22** | **48** | **1** | **1** |

### Klagur endaliga avgreiddar í 2019

Av teimum 72 klagunum, sum komu inn í 2019, vóru 59 endaliga avgreiddar innan 31. desember 2019.

Harumframt vóru avgreiddar 18 klagur frá undanfarnu árum.

Úrslitið av viðgerðini var hetta (býtt upp eftir myndugleika):

Talva 3






### Klagur endaliga avgreiddar í 2019

Talva 3

| Myndugleiki: | Klagur | Avvístar | Onnur viðgerð | Viðgjørdar við áliti |
|---|---|---|---|---|
| Almannaverkið | 6 | | 5 | 1 |
| Arbeiðs- og brunaeftirlitið | 2 | | 2 | |
| Barnaverndartænastur | 9 | | 9 | |
| Bú- og heimatænastur | 1 | | | 1 |
| Búnaðarstovan | 1 | 1 | | |
| Fíggjarmálaráðið | 3 | 1 | 1 | 1 |
| Fiskimálaráðið | 2 | | 2 | |
| Føroya Kærustovnur | 5 | | 4 | 1 |
| Havnar arbeiðskvinnufelag | 1 | 1 | | |
| Heilsu- og innlendismálaráðið | 1 | | 1 | |
| Heilsutrygd | 3 | | 2 | 1 |
| Kommunur | 23 | 3 | 11 | 9 |
| Landsbankin | 1 | | 1 | |
| Landssjúkrahúsið | 3 | | 2 | 1 |
| Landsverk | 1 | 1 | | |
| Løgmansskrivstovan | 2 | | 1 | 1 |
| Mentamálaráðið | 2 | | 2 | |
| Privat | 1 | 1 | | |
| Samferðslumálaráðið | 1 | | 1 | |
| Skúlar | 1 | | 1 | |
| Taks | 2 | 1 | 1 | |
| Trygdargrunnur Fiskivinnunar | 1 | | 1 | |
| Umhvørvisstovan | 2 | | | 2 |
| Uttanríkis- og Vinnumálaráðið | 2 | 1 | 1 | |
| Økistænastur | 1 | 1 | | |
| **Tilsamans** | **77** | **11** | **48** | **18** |

### Klagur viðgjørdar í 2019 har umboðsmaðurin veitti aðra viðgerð og hjálp til borgarar ella har grundarlag ikki var fyri at kanna málið

Í 2019 vórðu viðgjørdar 48 klagur, har umboðsmaðurin veitti aðra viðgerð og hjálp til borgarar ella har grundarlag ikki var fyri at kanna málið. Býtið teirra millum sæst niðanfyri:

Talva 4




| | |
|---|---|
| Gongd komin á málið | 12 |
| Umboðsmaðurin metti ikki grundarlag vera fyri at kanna málið | 22 |
| Klagari vístur til kærumyndugleika | 3 |
| Málið tikið uppaftur | 3 |
| Sent víðari til kærumyndugleika | 2 |
| Annað | 6 |
| **Tilsamans** | **48** |

### Klagur avvístar í 2019

Í 2019 vóru 11 klagur avvístar av ymiskum orsøkum. Býtið teirra millum sæst niðanfyri:

Talva 5




| Avvísingarorsøk: | Klagur |
|---|---|
| Innkomin ov seint | 4 |
| Kærumøguleiki ikki troyttur | 5 |
| Uttanfyri heimildarøki | 2 |
| **Tilsamans** | **11** |

**Viðgjørdar klagur í 2019 býttar á málsøki**

Tey málini, sum vóru endaliga viðgjørd í 2019, kunnu býtast upp eftir málsøki á hendan hátt:

Talva 6






**Viðgjørdar klagur í 2019 býttar á málsøki**

Talva 6

| Málsøki | Klagur |
|---|---|
| Almannamál | 5 |
| Arbeiðsmarknaðarmál | 4 |
| Barnaverndarmál | 9 |
| Búnaðarmál (leigumál) | 1 |
| Byggimál | 13 |
| Børn og ung | 2 |
| Fiskivinnumál | 1 |
| Flutningur, samskifti og vegir | 1 |
| Gegni | 1 |
| Heilsumál | 3 |
| Heilsutrygd | 1 |
| Innlit | 12 |
| Kommunumál | 1 |
| Landbúnaðarmál | 1 |
| Skattur v.m. | 3 |
| Skúlamál | 1 |
| Starvsfólkamál | 15 |
| Ymiskt | 3 |
| **Tilsamans** | **77** |

### Stabbadiagram: innkomnar klagur 2001 – 2019

Talva 7




### Mál tikin upp av egnum ávum – eftirlitsvitjanir og kanningar

Av teimum 2 málunum, sum umboðsmaðurin sjálvur tók upp í 2019, var 1 endaliga avgreidd innan 31. desember 2019. Harumframt vóru avgreidd 2 mál frá undanfarnu árum.

Talva 8

| Málini vóru býtt soleiðis millum ymisku myndugleikarnar | |
|---|---|
| Almannaverkið | 1 |
| Barnaverndartænastur | 1 |
| Tórshavnar kommuna | 1 |
| **Tilsamans** | **3** |

### Málsviðgerðartíðin hjá umboðsmanninum av viðgjørdum klagum

Í teimum 18 endaligu viðgjørdu klagunum í 2019, har álit varð skrivað, hevur miðalviðgerðartíðin verið hendan:
(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)

Talva 9

| Viðgerðartíð í miðal | | |
|---|---|---|
| Aftan á partshoyring | 2 mðr. | 15 dagar |
| Samlað | 7 mðr. | 24 dagar |

**Málsviðgerðartíðin av klagum hjá umboðsmanninum, sum hevði við sær aðra viðgerð og hjálp til borgarar**

Í teimum 48 klagunum, sum hevði við sær aðra viðgerð og hjálp til borgarar, hevur miðalviðgerðartíðin verið hendan:
(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)

Talva 10

| Viðgerðartíð í miðal: | | |
|---|---|---|
| Aftan á partshoyring | 0 mðr. | 6 dagar |
| Samlað | 1 mðr. | 12 dagar |

**Málsviðgerðartíðin hjá umboðsmanninum av avvístum klagum**

Í teimum 11 avvístu klagunum hevur miðalviðgerðartíðin verið hendan:
(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)

Talva 11

| Viðgerðartíð í miðal | |
|---|---|
| Aftan á partshoyring | 12 dagar |
| Samlað | 24 dagar |



**Málsviðgerðartíðin hjá umboðsmanninum av bæði viðgjørdum og avvístum klagum**

Fyri allar klagurnar, t.v.s. bæði avvístar og endaligar viðgjørdar klagur hevur málsviðgerðartíðin í miðal verið hendan:
(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)

Talva 12

| Viðgerðartíð í miðal: | | |
|---|---|---|
| Aftan á partshoyring | 0 mðr. | 22 dagar |
| Samlað | 2 mðr. | 25 dagar |

**Málsviðgerðartíðin hjá umboðsmanninum av málum tikin upp av egnum ávum:**

Í teimum 3 málum, sum vóru avgreidd í 2019, hevur miðalviðgerðartíðin verið hendan:

Talva 13

| Viðgerðartíð í miðal: | | |
|---|---|---|
| Aftan á partshoyring | 1 mðr. | 16 dagar |
| Samlað | 10 mðr. | 6 dagar |

# Sammetingar 2017 og 2018 og 2019

**Innkomnar klagur v.m.**

Mynd 1




**Avvísingarorsøk**

Mynd 2



**Innkomnar klagur býttar á málsøki**

Mynd 3




**Klagur um avgerðir, málsviðgerð og atburð**

Mynd 4



### Innkomnar klagur býttar á aðalráðini, kommunur o.a.

Mynd 5




### Mál tikin upp av egnum ávum – eftirlitsvitjanir og kanningar

Mynd 6





# IV Álit

Umboðsmaðurin viðger klagur um avgerðir hjá myndugleikunum, eins og viðferð teirra av borgarum og málum. Ein borgari kann t.d. klaga um, at ein umsókn er noktað, um tann valda viðgerðarháttin, um ta tíðina, sum hetta hevur tikið og/ella framferðarháttin hjá embætisfólkunum.

Um umboðsmaðurin, eftir at hava kannað málið, kemur til ta niðurstøðu, at hann gevur klagaranum viðhald, kann hann finnast at tí myndugleikanum, sum klagan snýr seg um. Umboðsmaðurin kann eisini heita á myndugleikan um at umhugsa málið av nýggjum og taka eina aðra avgerð. Umboðsmaðurin kann ikki sjálvur broyta eina avgerð. Uppgávan hjá umboðsmanninum er sostatt at greiða myndugleikanum frá, at hesin eftir hansara fatan hevur gjørt eitt mistak.

Niðanfyri eru dømir um mál, sum umboðsmaðurin hevur avgreitt við einum áliti ella hevur skrivað eina frágreiðing um.

MÁL NR. 18/00044

## Uppsøgn vegna samstarvstrupulleikar skal vera saklig og lutfalslig, upplýsingarnar skulu vera próvfastar, og ein víðkað partshoyringskylda er galdandi.

Ein advokatur vendi sær til umboðsmannin við eini klagu vegna eitt starvsfólk í Tórshavnar kommunu, sum var uppsagt vegna samstarvstrupulleikar. Advokaturin vísti á, at kanningarskyldan ikki varð hildin, áðrenn avgerð um uppsøgn varð tikin, at ávaring ikki varð givin, at lutfalsmeginreglan ikki varð hildin, og at avgerðin um uppsøgn var ósaklig.

*Krøv til uppsøgn í sambandi við samstarvstrupulleikar*
Umboðsmaðurin viðmerkti, at krøvini til vavið av kanningum í uppsagnarmálum vegna samstarvstrupulleikar eru lutfalsliga høg. Trygd skal vera fyri, at viðkomandi upplýsingar í málunum eru rættar, og at grundarlagið fyri uppsøgnini er sakligt. Arbeiðsgevarin skal kunna vísa á, hvørjir samstarvstrupulleikarnir eru, og hvønn týdning teir hava í sambandi við málið. Samstarvstrupulleikarnir mugu hava týðandi neiliga ávirkan á, hvussu uppgávurnar á arbeiðsplássinum verða loystar. Greitt samband skal vera millum samstarvstrupulleikarnar og tann persónin, sum verður sagdur úr starvi. Aðrir persónar mugu ikki vera høvuðsatvold til, at samstarvstrupulleikar taka seg upp og halda fram. Arbeiðsgevarin eigur eisini at hava gjørt hóskandi royndir at loysa samstarvstrupulleikarnir, áðrenn farið verður til eitt so víðfevnt starvsfólkarættarligt stig, sum ein uppsøgn er.

Í ítøkiliga málinum kundi staðfestast, at týðandi samstarvstrupulleikar vóru á arbeiðsplássinum, og at greitt samband var millum samstarvstrupulleikarnar og klagaran. Út frá skjalatilfarinum var tó ikki greitt, at tað var klagarin, sum var høvuðsatvoldin til, at samstarvstrupulleikarnir tóku seg upp og hildu fram, tí einki var skjalfest í uppritunum um orsøkirnar til ósemjurnar. Heldur ikki var skjalfest í uppritum frá samrøðum, sum klagarin hevði havt við leiðara sín, um talan var um rættleiðandi samrøður, har klagarin hevði fingið ábreiðslur ella munnliga ávaring fyri atburð sín. Ongar upplýsingar vóru í málinum um, at samstarvstrupulleikarnir høvdu týðandi neiliga ávirkan á, hvussu uppgávurnar á arbeiðsplássinum vórðu loystar.

Umboðsmaðurin vísti á, at í einum uppsagnarmáli, sum er grundað á samstarvstrupulleikar, er tað týdningarmikið at skjalfesta fráboðanir og samrøður, sum lýsa orsøkirnar til, at ósemjur koma í, og um samrøðurnar við starvsfólki eru rættleiðandi, og um ábreiðsla ella ávaring verður givin undir samrøðunum.

Sum avleiðing av samstarvstrupulleikunum hevði leiðarin skipað fyri einum toymismenningardegi fyri klagaranum og starvsfeløgunum saman við einum uttanhýsis ráðgeva. Í skjalatilfarinum sást ikki, at aðrar royndir vórðu gjørdar at loysa samstarvstrupulleikarnar, hóast samstarvstrupulleikarnir høvdu staðið við í langa tíð.

Umboðsmaðurin helt, at Tórshavnar kommuna kundi havt roynt onnur minni víðgongd inntriv enn uppsøgn, sum t.d. at flutt starvsfólk ella at bjóða klagaranum annað starv. Í minsta lagi átti kommunan, tá hon metti, at klagarin hevði høvuðsábyrgd av samstarvstrupulleikunum, at havt givið klagaranum eina ávaring, soleiðis at klagarin hevði havt møguleika at fingið samstarvið við starvsfelagar sínar í rættlag aftur.

Samanumtikið metti umboðsmaðurin ikki, at Tórshavnar kommuna hevði prógvað, at samstarvstrupulleikarnir høvdu týðandi neiliga ávirkan á, hvussu uppgávurnar á arbeiðsplássinum vórðu loystar, ella at tað var klagarin, sum var høvuðsatvoldin til, at samstarvstrupulleikarnir tóku seg upp og hildu fram. Umboðsmaðurin metti heldur ikki, at Tórshavnar kommuna hevði gjørt hóskandi royndir at loysa samstarvstrupulleikarnar við minni víðgongdum inntrivum enn uppsøgn.

*Víðkað hoyringarskylda*
Í uppsagnarmálum í sambandi við m.a. samstarvstrupulleikar er ein ikki lógarfest meginregla galdandi um víðkaða hoyringarskyldu. Tann, ið ætlanin er at siga úr starvi, hevur ikki bara rætt til at gera viðmerkingar til faktisku umstøðurnar, sum eru grundarlag undir ætlaðu uppsøgnini, men eisini til metingarnar hjá myndugleikanum um, hvørjar avleiðingar faktisku umstøðurnar skulu hava.

Í ætlanarskrivinum um uppsøgn vísti Tórshavnar kommuna á, at leiðarin í fleiri umførum hevði havt rættleiðandi samrøður við klagaran, men tað varð ikki upplýst, hvørjar ítøkiligar samrøður sipað varð til, og klagarin fekk ikki uppritini frá samrøðunum útflýggjað saman við ætlanarskrivinum. Klagarin hevði tí ikki møguleika fyri at gera seg kunnugan við grundarlagið fyri uppsøgnini og meta um, hvørt ætlaða stigið hjá myndugleikanum stóð mát við tað, sum var farið fram.

Í frágreiðingum til umboðsmannin vísti Tórshavnar kommuna á fleiri viðurskifti sum grundarlag fyri uppsøgnini, enn tey, sum vórðu nevnd í ætlanarskrivinum til klagaran.

Kommunan vísti í fyrsta lagi á, at klagarin hevði verið trupul at samskifta við, og at hetta sást serliga væl í teldupostsamskiftinum í sambandi við uppsøgnina. Umboðsmaðurin vísti á, at umrødda teldupostsamskifti í tíð lá aftan á, at Tórshavnar kommuna fór undir tilgongdina at siga klagaran úr starvi.

Kommunan vísti í øðrum lagi á, at klagarin hevði havt sera høga fráveru, hóast fráveran var fult lóglig. Starvsfelagarnir hjá klagaranum hóttu við at siga seg úr starvi, og kommunan metti tað ikki vera haldgott at seta nýggj fólk í starv fyri starvsfelagarnar, samstundis sum klagarin hevði nógva fráveru. Umboðsmaðurin helt tað ikki vera saklig orsøk at siga fólk úr starvi, tí at starvsfelagarnir annars hóttu við at siga upp. Hóast klagarin hevði havt høga fráveru, merkti hetta ikki, at fráveran fór at halda fram.

Kommunan vísti í triðja lagi á, at tað var trupult at manna størvini, tí talan var um serligan førleika. Umboðsmaðurin helt, at kommunan her dró viðurskifti inn, sum ikki vóru viðkomandi fyri at siga klagaran úr starvi.

Kommunan upplýsti, at kommunan hevði umrøtt flyting av klagaranum, men at leiðarin hjá starvsfólkinum helt tað verða sannlíkt, at trupulleikarnir hjá klagaranum vóru av persónligum/sálarligum slag, og ein flyting bara hevði flutt trupulleikarnar í annað starvsstað. Kommunan legði afturat, at ábendingar vóru um persónsórógv, um hugt varð eftir atferðini hjá klagaranum í hoyringartíðarskeiðinum. Umboðsmaðurin segði seg als ikki kunna góðtaka, at ein almennur myndugleiki og arbeiðsgevari nýtti slíkar orðingar uttan grundarlag og uttan at hava fakligan førleika til tess.

Umboðsmaðurin staðfesti, at Tórshavnar kommuna í ætlanarskrivinum hevði víst á samrøður, sum grundarlag fyri uppsøgnini, uttan at geva klagaranum ítøkiligar upplýsingar um samrøðurnar. Kommunan hevði eisini í frágreiðingum til umboðsmannin víst á faktisk viðurskifti og metingar, sum kommunan í ein ávísan mun hevði lagt dent

á í sambandi við uppsøgnina, men sum ikki vórðu løgd fyri klagaran til ummælis í ætlanarskrivinum. Hetta var als ikki nøktandi og leyk ikki krøvini til víðkaða partshoyring.

Umboðsmaðurin gav Tórshavnar kommunu eina álvarsliga átalu fyri handfaringina av málinum og bað kommununa um at taka viðgerðina av málinum uppaftur og lata seg frætta, hvat víðari hendi í málinum.

Av tí at umboðsmaðurin helt, at álvarslig mistøk vóru framd í hesum máli, avgjørdi umboðsmaðurin, sambært § 10, stk. 1 í umboðsmanslógini, at kunna borgarstjóran í Tórshavnar kommunu og landsstýriskvinnuna í kommunumálum um málið.

Tórshavnar kommuna boðaði seinni frá, at kommunan hevði tikið málið uppaftur og bjóðað klagaranum eina upphædd fyri fulla og endaliga avgreiðslu av málinum. Umboðsmaðurin lokaði tí málið.

MÁL NR 18/00125

## Burturvísing kundi ikki fremjast aftaná at tilboð um linari starvsrættarligt inntriv var givið

Ein advokatur vendi sær til umboðsmannin við eini klagu vegna eitt starvsfólk í Tórshavnar kommunu. Klagarin var burturvístur, tí hann hevði verið á skeið í eina viku og í dansi, meðan hann var sjúkrameldaður.

Tórshavnar kommuna metti, at klagarin hevði mishildið arbeiðstreytir sínar, og at klagarin, við sínum atburði, við grovum ósketni hevði longt um sjúkralegu sína, vísandi til § 5, stk. 1 í starvsmannalógini.

Klagarin førdi fram, at handfaringin av málinum og burturvísingin vóru ósakligar, at kommunan ikki reageraði rættstundis í sambandi við burturvísingina, at kommunan ikki reageraði lutfalsligt í mun til § 5, stk. 1 í starvsmannalógini, og at avgerðin hevði fyrisitingarlig brek viðvíkjandi meting, grundgeving og hoyring.

*Burturvísing skal fremjast uttan drál*
Umboðsmaðurin viðmerkti, at arbeiðsgevari kann burturvísa eitt starvsfólk, sum í týðandi mun hevur mishildið arbeiðsskyldur sínar. Ein ítøkilig meting skal gerast í hvørjum einstøkum føri, og próvbyrðan liggur í útgangsstøðinum hjá arbeiðsgevaranum. Er grundarlag fyri burturvísing, skal arbeiðsgevarin geva starvsfólkinum boð um burturvísingina skjótast gjørligt og uttan drál.

Í ítøkiliga málinum gingu 10 dagar frá tí, at deildarleiðarin varð varugur við, at klagarin hevði verið á skeið undir sjúkrameldingini, og 6 dagar frá tí, at klagarin hevði fingið at vita, at hann møguliga bleiv burturvístur, til klagarin fekk handað ætlanarskriv um burturvísing. Umboðsmaðurin vísti á, at um kommunan metti, at klagarin hevði mishildið starvstreytir sínar í so týðandi mun, at tað leyk treytirnar fyri eini burturvísing, átti kommunan uttan drál at havt givið klagaranum ætlanarskriv um burturvísing. Umboðsmaðurin helti tí til, at burturvísingin var dottin burtur vegna passivitet, men av tí at burturvísingin datt burtur av aðrari orsøk, gjørdi umboðsmaðurin ikki meira við hendan spurningin.

*Burturvísing sambært § 5, stk. 1 í starvsmannalógini*
Sambært § 5, stk. 1 í starvsmannalógini er sjúka ikki lóglig frávera, um so er, at starvsmaðurin í starvstíðini hevur verið úti eftir sjúkuni við vilja ella grovum ósketni. Fyri at burturvísa eftir hesi áseting skal starvsmaðurin bæði hava verið úti eftir sjúkuni og hava gjørt tað við vilja ella grovum ósketni.

Í ítøkiliga málinum segði læknin hjá klagaranum seg ongar læknaligar próvgrundir hava fyri, at sjúkan hjá klagaranum varð longd ella var versnað orsakað av, at klagarin hevði verið í dansi og luttikið á skeiði. Vísandi til hetta helt umboðsmaðurin tað vera ógjørligt at siga, um sjúkugongdin hjá klagaranum hevði verið annarleiðis, um klagarin ikki hevði verið á skeiði ella í dansi. Umboðsmaðurin helt tí ikki, at Tórshavnar kommuna hevði lyft próvbyrðina fyri, at klagarin, við at fara á skeið og í dans, hevði verið úti eftir sjúkuni.

*Burturvísing kann ikki fremjast aftaná tilboð um linari starvsrættarligt inntriv er givið*
Eitt starvsrættarligt inntriv skal vera lutfalsligt. Í sambandi við burturvísing eigur ein meting at verða gjørd av, um burturvísingin er lutfalslig, ella um eitt annað og minni inntrívandi starvsrættarligt stig, sum t.d. ein ávaring, er eitt meira hóskandi stig at taka.

Í ítøkiliga málinum boðaði Tórshavnar kommuna klagaranum frá, at ætlanin um burturvísing stóð við, men at kommunan var sinnað at gera eitt minni starvsrættarligt inntriv. Kommunan bjóðaði klagaranum annað líknandi starv við eini royndartíð á 3 mánaðir og at fáa eina ávaring fyri framferð sína. Klagarin tók ikki av tilboðnum frá kommununi, og kommunan gjørdi av at fremja upprunaligu ætlanina og burturvísti klagaran.

Umboðsmaðurin hevði onga viðmerking til, at Tórshavnar kommuna bjóðaði klagaranum flyting í annað líknandi starv og at geva klagaranum eina ávaring. Tilboðið frá kommununi mátti fatast soleiðis, at kommunan helt, hetta vera eitt meira lutfalsligt starvsrættarligt stig at taka enn ein burturvísing.

Umboðsmaðurin helt tí ikki, at kommunan, aftan á at hava bjóðað klagaranum flyting í annað starv og at geva klagaranum eina ávaring, kundi fremja tað strangari starvsrættaliga stigið, sum ein burturvísing er. Um kommunan metti, at atburðurin hjá klagaranum ikki kundi góðtakast, og at samstarvstrupulleikar vóru, átti kommunan í staðin at verið farin undir eina uppsagnartilgongd á hesum grundarlag.

Umboðsmaðurin gav Tórshavnar kommunu eina átalu fyri handfaringina av málinum og bað kommununa um at taka viðgerðina av málinum uppaftur og lata seg frætta, hvat víðari hendi í málinum.

Tórshavnar kommunu hevur seinni boðað frá, at kommunan hevur tikið málið uppaftur og hevur havt fund við klagaran.

MÁL NR 18/00071

## TAKS hevði heimild at seta upp forboðsskelti fyri mynda- og videoupptøkum í „tollfiltrinum“ í Vágum, og forboðið var sakligt grundað

Ein borgari klagaði til umboðsmannin um, at TAKS ikki helt fyrisitingarligar mannagongdir, tá TAKS setti forboð ímóti mynda- og videoupptøkum á tolløkinum á flogvøllinum í Vágum. Klagarin hevði biðið TAKS um innlit í skjøl, sum vístu mannagongdir, hoyring og viðgerð í sambandi við forboðið, men TAKS svaraði, at eingi skjøl vóru at lata innlit í.

*Heimild at seta forboðsskelti upp*
Umboðsmaðurin viðmerkti, at sambært løggildisgrundregluni (legalitetsprinsippinum) skulu reglur, sum gera inntriv í rættindi hjá einstaklingum við at skerja vanliga virkisfrælsi hjá borgarum ella leggja skyldur á borgarar, hava heimild í lóg. Løggildisgrundreglan hevur sum endamál at verja borgaran móti tilvildarligi útinnan av myndugleika. Hinvegin leggur løggildisgrundreglan ikki forðingar á vanliga virkisfrælsi, sáttmálafrælsi og eigararæði hjá myndugleikum. Ein almennur myndugleiki kann tí til dømis, sum ein og hvør annar eigari, vísa burtur óviðkomandi frá síni ogn, um ikki ferðslan er loyvd sambært lóg ella øðrum reglum. Ein almennur myndugleiki, kann eisini, sum ein og hvør privatur persónur, seta treytir ella forboð fyri myndatøku á einum øki, sum myndugleikin hevur rætt at ráða yvir, hóast økið er frítt atkomuligt.

Tolløkið á flogvøllinum í Vágum var arbeiðspláss hjá TAKS, og “tollfiltrið”, har ferðafólkini gingu ígjøgnum, og har forboðsskeltini vóru sett upp, var partur av arbeiðsøkinum, sum TAKS ráddi yvir. Umboðsmaðurin metti, at TAKS, sum almennur myndugleiki við ræðisrættinum yvir “tollfiltrinum”, kundi seta forboð fyri mynda- og videoupptøkum í “tollfiltrinum” uttan beinleiðis lógarfesta heimild.

*Fyrisitingarligar grundreglur skulu haldast*
Umboðsmaðurin viðmerkti, at reglurnar, sum ein fyrisitingarmyndugleiki ásetur viðvíkjandi rakstri av stovninum, mugu hava saklig atlit og mugu ikki fara longur enn neyðugt við atliti at endamálinum og virkseminum hjá stovninum.

Forboðið fyri mynda- og videoupptøkum í ”tollfiltrinum” var grundað á atlitið at eftirlitsvirkseminum, starvsfólkunum og teimum ferðandi, sum av einhvørjari orsøk vórðu tikin til viks ella fingu viðføri sítt kannað í kanningarøkinum. Umboðsmaðurin metti, at hesi atlit vóru saklig og lóglig. Økið, har forboðskeltini hingu, var avmarkað til “tollfiltrið”. Umboðsmaðurin metti hetta vera í samsvari við lutfalsmeginregluna, tí forboðið rakk ikki longri enn neyðugt við atliti at endamálinum og virkseminum hjá tollmyndugleikunum.

*Ikki notatskylda, men samskiftið átti at verði skjalfest sambært góðum fyrisitingarsiði*
Umboðsmaðurin viðmerkti, at TAKS ikki hevði notatskyldu, sambært § 6, stk. 1 í innlitslógini, tá TAKS setti upp forboðsskeltir fyri mynda- og videoupptøkum í “tollfiltrinum”, tí talan var ikki um eina fyrisitingarliga avgerð, men um útinning av ræðisrættinum hjá TAKS yvir økinum. Umboðsmaðurin metti tó, at TAKS, sambært góðum fyrisitingarsiði, átti at havt skjalfest samskiftið millum lógardeildina og deildarleiðaran á Tolldeildini, so tað hevði verið lætt at staðfest, nær forboðsskeltini vórðu sett upp, hvat øki forboðið snúði seg um, hvørji atlit vóru grundarlag fyri forboðnum, og um hesi vóru saklig og í samsvari við fyrisitingarligar grundreglur. Umboðsmaðurin boðaði frá, at hann gjørdi ikki meira við málið.

MÁL NR 18/00117

## Mentamálaráðið hevði heimildina at áseta reglur viðvíkjandi ráðleggingardøgum á dagstovnum

Ein borgari vendi sær til umboðsmannin við klagu um, at Tórshavnar kommuna stongdi dagstovnar gerandisdagar í sambandi við ráðleggingardagar hjá starvsfólkunum. Klagarin metti, at foreldur høvdu eitt rættarkrav um ansing allar gerandisdagar sambært lóg og avtalu, eisini tá ráðleggingardagur var.

Tórshavnar kommuna vísti á, at eingin beinleiðis lógar- ella kunngerðarheimild var í dagstovnalógini um ráðleggingardagar, hvørki tá um skipan, innihald ella annað viðvíkti, men at siðvenja var, at dagstovnarnir í kommununi høvdu tveir ráðleggingardagar um árið, og at stovnarnir vanliga vóru stongdir tá. Mentamálanevnd Tórshavnar býráðs hevði samtykt reglugerð fyri dagstovnaøkið, sum staðfesti nakrar yvirskipaðar reglur um skipan við ráðleggingardøgum fyri dagstovnaøkið í kommununi.

Umboðsmaðurin viðmerkti, at sambært § 3, stk. 1 í dagstovnalógini og viðmerkingunum til lógina hevði kommunan ábyrgdina av dagstovnaøkinum í kommununi, men kommunan hevði ikki skyldu til at bjóða øllum børnum í kommununi stovnspláss. Pláss á dagstovni var eitt tilboð, sum borgarar í kommununi kundu taka av og gjalda ein part av kostnaðinum fyri.

Sambært § 3, stk. 2 í dagstovnalógini og viðmerkingunum til lógina høvdu dagstovnar vanliga opið í dagtímunum hvønn gerandisdag, men møguleiki skuldi vera hjá einum dagstovni og eini dagrøkt at hava opið alt samdøgrið ella í vikuskiftunum. Umboðsmaðurin viðmerkti, at eftir orðaljóðinum í § 3, stk. 2 høvdu dagstovnar opið gerandisdagar í dagtímunum. Dagstovnalógin ásetti tó ikki, at dagstovnar skuldu hava opið hvønn gerandisdag. Lógin hevði onga allýsing av, hvat ein gerandisdagur var, og um ávísir dagar, sum t.d. jólaaftan og ólavsøkuaftan, ikki vóru at meta sum gerandisdagar. Umboðsmaðurin metti tí, at lógin ikki álegði kommununum eina skyldu at hava ansingarpláss til taks allar gerandisdagar í árinum, sum t.d. í sambandi við ráðleggingardagar.

*Heimild at gera reglur viðvíkjandi ráðleggingardøgum*
Sambært § 3, stk. 3 í dagstovnalógini var tað landsstýrismaðurin, sum ásetti nærri reglur um námsfrøðiliga stevnumiðið, starvsfólkasamanseting og virksemið á dagstovnum og dagrøktum. Sambært viðmerkingunum til lógina skuldi m.a. standa í reglunum, at dagstovnar skuldu hava reglugerðir.

So vítt umboðsmaðurin dugdi at síggja var kunngerð nr. 62 frá 1. apríl 1993 um dagstovnar, dagrøkt og døgnstovnar fyri børn og ung enn í gildi. Í § 3 í kunngerðini var ásett, at dagstovnar skuldu hava viðtøkur, ið vóru góðkendar av Føroya landsstýri. Í viðtøkunum skuldi m.a. verða ásett nærri reglur um, hvør, ið hevði heimild at avgera upplatingartíð og annað viðvíkjandi dagliga rakstrinum av stovninum.

Umboðsmaðurin vísti á, at bæði í § 3, stk. 3 í dagstovnalógini og í § 3 í kunngerð nr. 62 frá 1. apríl 1993 um dagstovnar, dagrøkt og døgnstovnar fyri børn og ung, var tað landsstýrismaðurin, sum hevði heimild til ávikavist at áseta reglur og at góðkenna viðtøkur um virksemið á dagstovnum, m.a. nær hesir skuldu hava opið, t.d. í sambandi við ráðleggingardagar. Av tí at eingin kunngerð var gjørd hesum viðvíkjandi, mælti umboðsmaðurin Mentamálaráðnum, sum varðaði av dagstovnalógini, til at fáa greiðu á hesum viðurskiftum og lata seg frætta, hvat víðari hendi í málinum. Burtursæð hesum gjørdi umboðsmaðurin ikki meira við málið.

Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur boðað umboðsmanninum frá, at ráðið arbeiðir við málinum, men at støða enn ikki er tikin til, hvussu hesin spurningur verður loystur.

MÁL NR 19/00068

## Innanhýsis skjal gjørdist uttanhýsis og harvið fevnt av almennum innliti

Ein fjølmiðil klagaði til umboðsmannin um, at Løgmansskrivstovan ikki vildi lata innlit í eitt skjal, sum Løgmansskrivstovan metti vera eitt innanhýsis skjal. Í umrødda skjalinum hevði eitt embætisfólk á Løgmansskrivstovuni mett um, hvørt løgmansstjórin var gegnig at taka avgerð í einum máli, sum hevði stóran almennan áhuga.



Løgmaður hevði heitt á umsitingina í Uttanríkis- og vinnumálaráðnum (UVMR) um at vera sær til hjálpar at meta um gegni løgmansstjórans. Umsitingin í UVMR hevði ikki fingið umrødda skjalið útflýggjað ella fingið avrit av tí, men eitt embætisfólk hjá UVMR hevði sæð skjalið, tá embætisfólkið var í journalini á Løgmansskrivstovuni og hugdi ígjøgnum alt tilfarið, sum lá í málinum.

Umboðsmaðurin vísti á, at eitt innanhýsis arbeiðsskjal, sum verður latið øðrum myndugleika ella øðrum uttanfyri myndugleikan, missir sítt innanhýsis eyðkenni og verður fevnt av almennum innliti við teimum møguligu avmarkingum, sum eru í innlitslógini. Spurningurin var, um umrødda skjalið mátti metast at vera latið UVMR og harvið vorðið eitt uttanhýsis skjal, tí embætisfólkið hjá UVMR hevði sæð skjalið í journalini á Løgmansskrivstovuni.

Umboðsmaðurin vísti á viðmerkingarnar í Betænkning om offentlighedsloven frá 2009, bind 1, síðu 571-572, har m.a. varð sagt um hugtakið "at lata" eitt innanhýsis skjal:

> "I de tilfælde, hvor et internt dokument er gjort fysisk tilgængeligt for en udenforstående, vil det således miste sin interne karakter, og det vil være "afgivet" i den forstand som dette udtryk anvendes i lovudkastets § 23, stk. 2.
>
> I den forbindelse er det efter kommissionens opfattelse uden betydning, på hvilken måde dokumentet er gjort fysisk tilgængeligt for den udenforstående, så længe den afgivende myndighed frivilligt og bevidst har gjort det muligt for en udenforstående at gøre sig bekendt med dokumentet. Er det tilfældet, må den pågældende myndighed antages at have valgt at opgive retten til at beskytte sine interne dokumenter.
>
> …
>
> Et internt dokument skal også anses for afgivet i tilfælde, hvor myndigheden – uden at det er muligt for udenforstående at komme i egentlig fysisk besiddelse af dokumentet – har gjort det muligt for udenforstående at gøre sig bekendt med dokumentet på en måde og i et omfang, der ganske må ligestilles med, at dokumentet er gjort fysisk tilgængeligt for en udenforstående.
>
> Som et tilfælde, der ganske må ligestilles med, at dokumentet er gjort fysisk tilgængeligt for en udenforstående, kan nævnes det tilfælde, hvor en embedsmand på et møde udlåner det pågældende dokument til de øvrige mødedeltagere, men således at de, efter at have læst dokumentet, afleverer det igen ved mødets afslutning. I et sådant tilfælde vil dokumentet blive anset for afgivet i lovens forstand"

Vísandi til hetta helt umboðsmaðurin, at umrødda skjalið mátti metast at vera latið umsitingini í UVMR, tá embætisfólkið í UVMR fekk fysiska atgongd at lesa skjalið í journalini á Løgmansskrivstovuni. Skjalið var sostatt vorðið uttanhýsis og harvið fevnt av almennum innliti við teimum møguligu avmarkingum, sum vóru í innlitslógini.

*Umsitingin hjá UVMR sum ad hoc Løgmansskrivstova í málinum*
Løgmansskrivstovan førdi fram, at hóast lagt varð til grund, at umrødda skjalið var latið umsitingini hjá UVMR, so gjørdist tað kortini ikki uttanhýsis, tí umsitingin hjá UVMR virkaði sum ad hoc Løgmansskrivstova í málinum, tí løgmaður hevði heitt á umsitingina hjá UVMR um at verða honum til hjálpar í málinum. Løgmaður hevði politiska og rættarliga ábyrgd mótvegis Løgtinginum, fyri tað sum hendi, og ikki landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum, og tí var skjalið innanhýsis.

Hesum var umboðsmaðurin ikki samdur í. Umboðsmaðurin vísti á, at Løgmansskrivstovan og UVMR vóru tvey sjálvstøðug ráð og harvið tveir ymiskir myndugleikar. Einki var, sum bendi á, at embætisfólkið í UVMR var lænt út til Løgmansskrivstovuna fyri at gera skrivarauppgávu fyri Løgmansskrivstovuna, ella at embætisfólkið í UVMR var undir vegleiðing og eftirliti av Løgmansskrivstovuni, meðan tað viðgjørdi spurningin um gegni løgmansstjórans. Umboðsmaðurin helt, at støðan heldur kundi javnsetast við, at løgmaður hevði biðið ein uttanhýsis ráðgeva um at gera eina meting av gegni løgmansstjórans.

*UVMR sum eftirkanningarstovnur í málinum*
Løgmansskrivstovan førdi síðani fram, at hóast lagt varð til grund, at UVMR var sjálvstøðugur stovnur í málinum, so gjørdist skjalið ikki uttanhýsis, tí UVMR hevði fingið øll skjølini í málinum í sambandi við eftirkanningararbeiðið sítt. Eitt innanhýsis skjal gjørdist ikki uttanhýsis av tí, at ein eftirkanningarstovnur fekk skjalið útflýggjað í sambandi við eftirkanningararbeiðið sítt.

Hesum var umboðsmaðurin ikki samdur í. Umboðsmaðurin vísti á, at í nøkrum førum var í lóggávu lagt upp fyri, at innanhýsis skjøl ikki mistu sítt innanhýsis eyðkenni, hóast tey vórðu send øðrum myndugleikum, t.d. løgtingsgrannskoðarunum, Løgtingsins umboðsmanni og landsstýrismanninum í sambandi við lógarálagda eftirlitið við kommununum. Sama rættarstøða var helst eisini galdandi fyri innanhýsis skjøl, sum vórðu latin einum kanningarstjóra, sum var ein serligur eftirlitsstovnur, sum formliga varð skipaður av løgtingsformanninum í einstøkum førum, grundaður á eitt ítøkiligt mál. Umboðsmaðurin vísti á, at UVMR ikki var ein eftirkanningarstovnur, sum hevði eitt framhaldandi og víðfevnt eftirlit, og at UVMR heldur ikki var formliga skipað sum eftirkanningarstovnur í ítøkiliga málinum.

*Meirinnlit*
Undir málsviðgerðini hevði umboðsmaðurin spurt Løgmansskrivstovuna, um Løgmansskrivstovan hevði umhugsað at geva fjølmiðlinum meirinnlit í umrødda skjalið. Í viðmerkingum til umboðsmannin vísti Løgmansskrivstovan á, at ein avgerandi munur var á rættarstøðuni í føroysku og donsku innlitslógini viðvíkjandi meirinnliti. Í føroysku lógini var ikki krav um, at myndugleikin sjálvkravdur skuldi taka upp meirinnlitsmál, og meirinnlitsviðgerð varð ikki byrjað, uttan so, at serstakt varð biðið um tað, ella tað vóru aðrar umstøður, sum bendu á, at tað átti at verði gjørt.

Hesum var umboðsmaðurin ikki samdur í. Umboðsmaðurin vísti á, at hóast tað nú var lógarfest í nýggju donsku innlitslógini, at myndugleikin í sambandi við umbøn um innlit skuldi hugsa um, hvørt meirinnlit skuldi gevast, so var rættarstøðan viðvíkjandi meirinnliti óbroytt. Eisini áðrenn hesa lógaráseting um meirinnlit var rættarstøðan í Danmark tann, at myndugleikin í sambandi við umbøn um innlit átti at hugsa um at geva meirinnlit. Henda rættarstøða var eisini galdandi í Føroyum.

Umboðsmaðurin vísti á, at í ítøkiliga málinum var talan um eitt skjal viðvíkjandi gegni løgmansstjórans at taka avgerð í einum máli, sum hevði stóran almennan áhugað. Umboðsmaðurin helt, at Løgmansskrivstovan beinanvegin átti at havt umhugsað at givið innlit í umrødda skjalið í sínari heild sambært regluni um meirinnlit í tann mun, at onnur lóglig atlit ikki forðaðu fyri hesum.

*Uppafturtøka av innlitsumbønini*
Umboðsmaðurin bað Løgmansskrivstovuna um at taka innlitsumbønina frá fjølmiðlinum upp til nýggja viðgerð og lata seg frætta, hvat víðari hendi í málinum. Burtursæð frá hesum gjørdi hann ikki meira við málið.

Løgmansskrivstovan boðaði stutt aftaná frá, at fjølmiðilin hevði fingið innlit í umrødda skjalið.

MÁL NR 18/00023

## Vantandi svar frá Tórshavnar kommunu um útgjald av frítíðarískoyti og frítíðarløn

Umboðsmaðurin fekk eina klagu um, at Tórshavnar kommuna ikki hevði svarað trimum áheitanum um at viðgera feilir í útgjøldum av frítíðarpeningi hjá eini arbeiðskvinnu. Ikki fyrr enn klagað varð til umboðsmannin, fór kommunan undir at viðgera málið. Í sínum fyrsta ummæli av klaguni róði kommunan fram undir, at klagarin sjálvur hevði ábyrgdina av feilunum í útgjøldunum av frítíðarlønini. Umboðsmaðurin minti kommununa á, at tað áliggur almennum myndugleikum sum partur av góðum fyrisitingarsiði at samskifta høviskliga og fara virðiliga við borgarum.

Tá samanum kom, vísti tað seg, at limir hjá Havnar Arbeiðskvinnufelag í lønarskipanini hjá Gjaldstovuni høvdu verið skrásettir ikki at hava rætt til frítíðarløn fyri ólagaliga arbeiðstíð, og at arbeiðskvinnan ikki hevði fingið frítíðarískoyti fyri eitt ár. Arbeiðskvinnan átti góðar 16.000 kr. til góðar. Sum framhald av klaguviðgerðini hjá umboðsmanninum fór kommunan at kanna, hvørjar aðrar arbeiðskvinnur høvdu fingið ov lítið útgoldið í frítíðarløn av ólagaligari arbeiðstíð.

Umboðsmaðurin var samdur við kommununi í, at handfaringin als ikki var nøktandi, men umboðsmaðurin hevði torført við at góðtaka frágreiðingina um, at tvey skriv í sama máli av misgáum duttu niður í millum, og at eitt triðja ikki skuldi vera móttikið. Umboðsmaðurin helt hetta benda á, at mannagongdirnar við inngangandi skrivum ikki vóru nóg væl skipaðar og mælti kommununi til at endurskoða hesar.

MÁL NR 18/00064

## Tórshavnar kommuna fekk eina álvarsliga átalu fyri handfaringina av máli um uppsøgn av formanninum fyri húsavørðarnar í Tórshavnar kommunu

Umboðsmaðurin fekk eina klagu um, at Tórshavnar kommunu hevði sagt formannin fyri húsavørðarnar úr starvi vegna samstarvstrupulleikar.

Umboðsmaðurin helt tað vera sera átaluvert, at klagarin undan einum fundi, sum var at meta sum ein tænastusamrøða og ein formlig byrjan uppá tilgongdina at siga hann úr starvi, hvørki varð kunnaður um endamálið við fundinum ella fekk høvi at hava ein hjásita við á fundin. Umboðsmaðurin helt hetta kundi hava verið ein viðvirkandi orsøk til, at fundurin endaði við, at deildarleiðarin fyri Húsaumsitingina eftir fundin segði seg hava mist álitið á klagaran.

Umboðsmaðurin helt ikki, at kommunan hevði hildið reglurnar um víðkaðu partshoyringarskylduna og metti ikki, at kommunan hevði nøktandi skjalagrundarlag til at staðfesta, at talan var um óloysiligar samstarvstrupulleikar við dagstovnaleiðarar, umsitingina og húsavørðarnar, at hetta var oyðileggjandi fyri arbeiðið, ella at tað var formaðurin fyri húsavørðarnar, sum hevði høvuðsábyrgdina av hesum.

Umboðsmaðurin vísti á, at ætlar arbeiðsgevarin at gera vart við, at tænastan ikki verður útint á nøktandi hátt og geva boð um, at endurtøkur kunnu fáa starvsrættarligar fylgjur, so skal talan vera um formlig stig sum t.d. rættleiðandi samrøður. Kommunan segði seg ikki hava tikið stig til at geva átalu ella ávaring, tí sambært kommununi høvdu slík stig neyvan givið nakað úrslit. Umboðsmaðurin helt tað vera átaluvert, at kommunan eingin formlig stig tók til tess at rætta støðuna upp, hóast kommunan í frágreiðing til umboðsmannin segði, at samstarvstrupulleikarnir vóru vorðnir ovurhonds stórir og darvaðu dagligu gongdini.

Av tí at ósamsvar var ímillum skrivliga grundarlagið hjá kommununi í málinum og frágreiðingina til umboðsmannin um grundarlagið fyri uppsøgnini, gjørdi umboðsmaðurin av at síggja burtur frá pørtum av frágreiðingini hjá Tórshavnar kommunu í viðgerðini av málinum.

Umboðsmaðurin gav Tórshavnar kommunu eina álvarsliga átalu fyri handfaringina av málinum og heitti á kommununa um at viðgera málið av nýggjum og lata seg frætta, hvat víðari hendi í málinum. Álitið varð samsvarandi § 10, stk. 1 í umboðsmanslógini sent borgarstjóranum í Tórshavnar kommunu og landsstýriskvinnuni í kommunumálum.

MÁL NR 18/00089

## Fugloyar kommunu brúkti ov langa tíð at svara eini innlitsumbøn, og málsviðgerðin var ikki nøktandi

Ein borgari vendi sær í september 2018 til umboðsmanninum við eini klagu, tí hann ikki fekk svar frá Fugloyar kommunu uppá eina innlitsumbøn. Klagarin hevði biðið Fugloyar kommunu um innlit í eitt mál í apríl 2018.

Umboðsmaðurin bað Fugloyar kommunu um eina frágreiðing og um skjølini í málinum. Í skjølunum frá kommununi vóru eingi skjøl viðvíkjandi viðgerðini av innlitsumbønini. Umboðsmaðurin vendi sær tí aftur til kommununa og bað um hesi skjøl og heitti samstundis á kommununa um beinanvegin at avgreiða innlitsumbønina, um hon enn ikki var avgreidd, og senda sær avrit av svarinum til klagaran.

Sambært § 16 stk. 1 og 2 í innlitslógini (løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina) skal ein myndugleiki, sum fær eina innlitsumbøn, sum skjótast gera av, um áheitanin kann verða gingin á møti. Er áheitanin um innlit ikki gingin á møti ella noktað innan 10 dagar eftir, at viðkomandi myndugleiki hevur móttikið hana, skal myndugleikin boða viðkomandi frá um orsøkina til hetta, og nær ein avgerð væntandi verður til skjals.

Klagarin bað um innlit 10. apríl 2018. Tann 26. juni 2018 sendi klagarin Fugloyar kommunu áminning um innlitsumbønina og vísti á, at ein innlitsumbøn eigur at verða svarað innan 10 dagar. Klagarin fekk innlit frá Fugloyar kommunu tann 25. mars 2019. Tað tók sostatt Fugloyar kommunu góðar 11 mánaðir at svara innlitsumbønini.

Í samskiftinum við Fugloyar kommunu kom fram, at kommunan helt seg hava svarað innlitsumbønini frá klagaranum við at senda umboðsmanninum frágreiðing og skjøl, hóast umboðsmaðurin í skrivinum til kommununa, bað kommununa avgreiða innlitsumbønina og vegleiddi kommununa um reglurnar viðvíkjandi viðgerð av innlitsumbønum. Klagarin fekk ikki svar frá Fugloyar kommunu fyrr enn góðar 5 mánaðir aftaná, at umboðsmaðurin hevði vegleitt kommununa. Í hesum tíðarskeiði sendi umboðsmaðurin tvær áminningar til kommununa, umframt at tosa í telefon við kommununa um málið. Tá umboðsmaðurin aftur minti kommununa á málið tann 29. apríl 2019, fekk hann kunning um, at innlitsumbønin var avgreidd tann 25. mars 2019. Umboðsmaðurin helt hetta als ikki vera nøktandi fyrisiting. Klagarin fekk onga móttøkuváttan, tá hann sendi Fugloyar kommunu innlitsumbønina, og hann fekk einki svar frá kommununi, tá hann sendi áminning um innlitsumbønina. Umboðsmaðurin vísti á, at hetta ikki var í samsvari við góðan fyrisitingarsið.

Umboðsmaðurin helt tað vera sera átaluvert, at tað tók Fugloyar kommunu gott 11 mánaðir at avgreiða innlitsumbønina frá klagaranum og gav Fugloyar kommunu eini

álvarsliga átalu fyri handfaringina av málinum. Av tí at umboðsmaðurin helt, at talan var um álvarsom brek við viðgerðini av málinum, boðaði hann, samsvarandi § 10 stk. 1 í umboðsmanslógini, formansskapinum í Løgtinginum, løgmanni og landsstýrismanninum í kommunumálum frá niðurstøðu síni.

MÁL NR 19/00037

## Mannagongdin hjá Landssjúkrahúsinum í sambandi við útvegan av serlæknaváttan var ikki nóg góð

Borgari sendi umboðsmanninum klagu um drúgva málsviðgerðartíð á Psykiatriska deplinum í sambandi við umsókn um fyritíðarpensjón. Klagarin helt, at tað ikki var nøktandi at skula bíða eitt heilt ár bara fyri at koma í viðtalu hjá serlækna, so váttanin kundi gerast.

Í málinum sást, at tá klagarin søkti um fyritíðarpensjón í januar 2018, bað Almannaverkið Landssjúkrahúsið um serlæknaváttan um støðu klagarans. Hóast bæði Almannaverkið og klagarin støðugt mintu Landssjúkrahúsið á málið, hendi einki.

Umboðsmaðurin bað Landssjúkrahúsið um eina frágreiðing um málið og um skjalayvirlitið í málinum. Landssjúkrahúsið svaraði umboðsmanninum, at Psykiatriski depilin nú hevði avgreitt málið og sent serlæknaváttan til Almannaverkið. Landssjúkrahúsið hevði ikki annað skjalayvirlit í málinum enn umbønina frá Almannaverkinum. Við grundarlagi í henni hevði Landssjúkrahúsið gjørt avtalu við serlækna í psykiatri um at gera sjálva serlæknaváttanina.

Frágreiðingin frá Landssjúkrahúsinum vísti, at Landssjúkrahúsið ikki hevði havt eftirlit við gongdini í málinum, og at skrásetingini av skjølunum í ymisk mál hevði elvt til ógreiðleika. Frágreiðingin vísti eisini, at Landssjúkrahúsið ikki í nóg stóran mun hevði átikið sær ta myndugleikaábyrgd, sum Landssjúkrahúsið hevur í mun § 31 í pensjónslógini at svara umbønum frá Almannaverkinum um serlæknaváttanir.

Umboðsmaðurin hevði onga viðmerking til, at Landssjúkrahúsið heitti á serlæknar um at gera serlæknaváttanir fyri seg, men umboðsmaðurin helt tað ikki vera nøktandi, at Landssjúkrahúsið síðani legði ábyrgdina at fylgja málinum frá sær.

Umboðsmaðurin vísti á, at tá annar myndugleiki biður Landssjúkrahúsið um eina serlæknaváttan, eigur Landssjúkrahúsið at hava eina skipan, sum tryggjar eina nøktandi avgreiðslutíð. Hetta kann gerast, við at Landssjúkrahúsið av sínum eintingum fylgir málinum t.d. við at seta freistir, tá serlækni verður biðin um at gera eina serlæknaváttan, og at Landssjúkrahúsið síðani hevur eftirlit við, at umbidna arbeiðið verður gjørt.

Umboðsmaðurin mælti Landssjúkrahúsinum til at endurskoða sínar mannagongdir í sambandi við mál, har Almannaverkið biður Landssjúkrahúsið um serlæknaváttanir.

MÁL NR 19/00062

## Vegleiðingin frá Almannaverkinum var ov vánalig

Borgari klagaði til umboðsmannin um, at ALS-skipanin og dagpeningaskipanin ikki tryggja persónar, sum vegna serligar umstøður, m.a. hava sjúkt barn, ikki kunnu átaka sær fulltíðarstørv. Klagarin vísti á avgerð frá Kærunevndini í almanna-, familju- og heilsumálum og avgerð frá kærunevndini hjá Arbeiðsloysisskipanini. Umboðsmaðurin hevði ikki viðmerkingar til nevndu avgerðir, og boðaði tí klagaranum frá, at hann gjørdi ikki meira við hendan partin av klaguni.

Borgarin klagaði eisini um vánaliga kunning og vegleiðing frá Almannaverkinum í sambandi við, at hon kendi seg noydda at siga seg úr starvi. Hon greiddi frá, at hon hevði barn við serligum tørvi, og at hon tí arbeiddi hálva tíð og fekk veiting frá Almannaverkinum vegna mista inntøku fyri hálva tíð. Av tí at arbeiðsstøða hennara ikki var haldgóð og vegna privatar avbjóðingar, segði klagarin seg úr starvi í februar 2018. Hon fekk sína síðstu løn síðst í mars 2018. Stutt aftaná hetta varð hon sjúkrameldað, men hon kundi tá hvørki fáa veiting frá ALS ella dagpengar. Seinni fekk hon játtað forsorgarveiting. Klagarin vísti á, at hon hevði boðað Almannaverkinum frá, at arbeiðsstøða hennara ikki var haldgóð, og at hon hevði privatar avbjóðingar, men at Almannaverkið onga ráðgeving hevði givið henni um framtíðarmøguleikar og fylgjurnar av, at hon segði seg úr starvi.

Umboðsmaðurin helt, at málsgongdin og málsupplýsingarnar greitt vístu, at klagarin hevði kunnað Almannaverkið um truplu arbeiðsstøðuna og persónligu støðu sína, sum gjørdu, at hon hevði trupult við at megna gerandisdagin. Klagarin hevði m.a. upplýst fyri Almannaverkinum, at hon hevði tørv á hvíld í tríggjar mánaðir ella farloyvi fyri at koma fyri seg. Klagarin søkti um endurgjald fyri mista inntøku fulla tíð, men umsóknin varð sýtt, tí barn hennara við serligum tørvi var á stovni hálva tíð. Almannaverkið gjørdi ikki meira við støðu klagarans, hóast tað var týðiligt, at talan var um eina strongda støðu. Umboðsmaðurin helt, at tað júst er í slíkum støðum, at Almannaverkið eigur at hugsa um sína vegleiðingarskyldu. At siga seg úr starvi í tí støðu, sum klagarin var í, kundi viðføra eina sera óvissa og ikki haldgóða støðu fyri klagaran bæði fíggjarliga, arbeiðsliga og persónliga.

Umboðsmaðurin helt, at tá Almannaverkið sýtti klagaranum stuðul fyri mista inntøku fulla tíð, átti Almannaverkið at havt bjóða klagaranum til samtalu og vegleitt klagaran um at kanna møguleikarnar fyri eini sjúkramelding. Harvið var klagarin ikki komin í ta óhepnu støðuna, hon var komin í vegna egnu uppsøgn, uttan møguleika fyri at fáa dagpening ella veiting frá ALS. Umboðsmaðurin helt tí, at Almannaverkið ikki hevði hildið persónligu vegleiðingarskylduna.

Umboðsmaðurin gav Almannaverkinum eina átalu fyri handfaringin av málinum.



# V FRÁGREIÐINGAR

Umboðsmaðurin kann kanna eitt mál, uttan at tað finst nøkur klaga hesum viðvíkjandi. Umrøða í fjølmiðlunum kann t.d. hava við sær, at umboðsmaðurin gerst varur við eitt mál, sum hann ynskir at kanna nærri. Onkuntíð kunnu klagur vera orsøk til, at umboðsmaðurin fer at kanna viðurskifti, sum tað ikki er klagað um.

Niðanfyri eru dømir um mál, sum umboðsmaðurin hevur kannað og skrivað eina frágreiðing um.

MÁL NR. 17/00048

## Umboðsmaðurin á eftirlitsvitjanum í Trivnaðareind 10 hjá Almannaverkinum

Umboðsmaðurin hevur verið á eftirlitsvitjanum á deildum hjá Trivnaðareind 10 hjá Almannaverkinum. Trivnaðareind 10 tekur ímóti børnum og ungum, sum Høvuðsbarnaverndarnevndin tekur avgerð um skulu búgva á deild hjá Trivnaðareind 10. Eftirlitsvitjaninar fevndu um Nýggjustovu og Trappustovu, Pedda við Steingøta 10, Tórshavn, Jekarastovu, Jekaragøta 8, Tórshavn, Garðsstovu, Garðsgøta 31, Argir, og Serskipanina, Móttøkudeildina og Argjaboðagøtu, Argjaboðagøta 7, Argir. Íalt vóru 19 børn og ung á deildunum, sum umboðsmaðurin vitjaði.

Eftirlitsvitjanirnar tóku útgangsstøði í Barnaverndarlógini og Barnarættindasáttmálanum hjá ST. Børn, sum eru umsorganaryvirtikin, eru í eini sárbærari støðu og hava ofta serligar avbjóðingar. Tey hava tí brúk fyri serligari umsorgan, stuðli og viðgerð. Tað er týdningarmikið at tryggja, at tey hava virðilig kor at liva undir, at rættindi teirra verða vird, og at tey verða ment soleiðis, sum tey hava rætt til.

Undir eftirlitsvitjanunum hugdi umboðsmaðurin m.a. at skúlatilboðum, frítíðartilboðum, sambandi við familjuna, og um børnini generelt høvdu virðiligar umstøður og ein virðiligan gerandisdag. Eisini hugdi umboðsmaðurin at reglum og mannagongdum á deildunum, umsiting av heilivági, og hvussu støðan var viðvíkjandi harðskapi og valdsnýtslu. Av tí at ætlanin var at byggja eitt nýtt barnaheim, hugsavnaði umboðsmaðurin seg ikki so nógv um fysisku karmarnar.

Í sambandi við eftirlitsvitjaninar hevði umboðsmaðurin samrøður við leiðsluna í Trivnaðareind 10 og tey starvsfólk og børn, sum ynsktu tað.

*Viðmerkingar og tilmæli frá umboðsmanninum*
Samanumtikið helt umboðsmaðurin, at fleiri álvarsligir trupulleikar vóru í Trivnaðareind 10, og at umstøðurnar hjá børnunum og teimum ungu kundu betrast munandi. M.a.

vísti umboðsmaðurin á, at hølini í Jekaragøtu vóru í ringum standi og ikki vóru nøktandi til virksemið. Leiðslan í Trivnaðareind 10 upplýsti seinni, at Jekarastova varð stongd í juli 2018. Umboðsmaðurin heitti á Almannaverkið um at tryggja, at ognirnar, har Trivnaðareind 10 helt til, vórðu røktar.

Í framhaldi av eftirlitsvitjanunum mælti umboðsmaðurin til:

- at aðalráðini mentu samstarvið tvørtur um myndugleikaøkir og fakøkir og samstarvaðu sína millum um tørvin hjá børnunum í Trivnaðareind 10.

- at greiða sum skjótast fekst á, hvørjar útreiðslur vóru fevndar av heildartilboðnum hjá Trivnaðareind 10, og hvørjar útreiðslur kommunurnar skuldu gjalda útyvir hetta, soleiðis at børnini fingu tilboð um ta viðgerð og kundu luttaka í tí frítíðarvirksemi, tey høvdu tørv á.

- at leiðslan á Almannaverkinum, saman við starvsfólkunum, eftirmetti nýggja leiðslubygnaðin við toymisleiðslu, so støða kundi takast til, um skipanin var nøktandi, ella um onnur skipan skuldi finnast.

- at arbeiðið við at orða og skjalfesta endamál, vegleiðingar, mannagongdir, húsreglar o.tíl. helt fram, soleiðis at tað varð greiðari, hvat Trivnaðareind 10 stóð fyri og hvørji tilboð Trivnaðareind 10 hevði. At stovnurin fekk ein skjalfestan politikk viðvíkjandi t.d. royking, nýtslu av rúsdrekka og rúsevnum og atgongd og nýtslu hjá børnunum til teldu, teldil og telefon. At sami leistur varð brúktur, tá skrivað varð í journalirnar hjá børnunum, soleiðis at journalirnar vórðu meira gjøgnumskygdar og samanberandi.

- at føst mannagongd varð fyri, hvussu nýggj starvsfólk vórðu kunnað um stovnin og deildina, har tey skulu arbeiða, og at tey beinanvegin fingu atgongd til AV-netið við týðandi upplýsingum. At øll starvsfólk vórðu kunnað, tá mannagongdir og nýggjar skipanir vórðu lagdar á AV-netið, og at greiða fekst á tørvinum hjá starvsfólkunum á supervisión.

- at stovnurin fekk ein harðskapspolitikk, soleiðis at starvsfólkini vórðu tilvitað um, hvussu tey fyribyrgdu harðskapi, og at leiðslan varð tilvitað um, hvussu hon hjálpti starvsfólkum og børnum aftaná harðskapstilburðir. At fysisk tiltøk at fyribyrgja harðaskapi vórðu sett í verk, har tað var neyðugt.

- at fastur sálarfrøðingur varð knýttur at Trivnaðareind 10.

- at ein ítøkilig meting varð gjørd, um skúlatilboðið hjá hvørjum einstøkum barni var nøktandi.

- at leiðreglur vórðu gjørdar fyri, hvørjar útreiðslur lummapeningurin hjá børnunum skuldi fevna um, so staðfestast kundi, um upphæddirnar til lummapening vóru nøktandi.



Umboðsmaðurin vísti á:

- at bæði børn og starvsfólk høvdu tørv á støðugleika fyri at føla seg trygg og kunna virka til fulnar í gerandisdegnum. Umboðsmaðurin metti, at stórur tørvur var á einum nútíðarhóskandi barnaheimi, so børnini kundu fáa tær umstøður og ta viðgerð, tey høvdu tørv á.

- at tað var týdningarmikið, at Trivnaðareind 10 fekk nóg mikið av upplýsingum frá barnaverndartænastunum til at kunna viðgera barnið beinanvegin, tað kom á stovnin.

- at ein av fortreytunum fyri, at viðgerðin av børnunum skuldi eydnast, var, at karmarnir vóru í lagi. Børnini áttu at búgva á eini deild, sum hóskaði best til teirra tørv, soleiðis at uppihaldið á stovninum varð støðugt og væleydnað. Sum meginregla áttu børn við ymiskum sjúkuavgerðum ikki at búgva saman. Umboðsmaðurin metti, at eindirnar í einum nýggjum barnaheimi áttu at vera smidligar, soleiðis at møguligt varð at bólka børnini í betri hóskandi eindir bæði viðvíkjandi eitt nú tali, sjúkuavgerðum, og hvussu børnini hóskaðu at búgva saman. Umboðsmaðurin metti, at ung við rúsevnistrupulleikum ikki áttu at búgva saman við børnum og ungum uttan hesar trupulleikar.

- at tað var týdningarmikið fyri rættartrygdina bæði hjá børnum og starvsfólkum, at harðskapur og valdsnýtsla varð fráboðað. Skjalfesting av harðskapi hevði týdning fyri støður, sum kundu koma í seinni, sum t.d. arbeiðsskaða og strongd hjá starvsfólki. Harðskapur millum børn og ung átti at skjalfestast, fyri m.a. at fyribyrgja óhepnari atferð hjá børnum og ungum, sum elvdi til harðskap og hóttanir. Teir persónar, sum høvdu verið uppi í hending við valdsnýtslu ella harðskapi, áttu at fáa skjalfesta afturboðan frá leiðsluni og tilboð um sálarfrøðiliga hjálp.

- at børnini áttu at verða hoyrd í sambandi við val av egnum kontaktpersónum.

- at børnini áttu at hava tøtt og støðug umsorganarsambond og eitt gott netverk uttanfyri Trivnaðareind 10.

Umboðsmaðurin var nøgdur við, at Almannaverkið í framhaldi av eftirlitsvitjanunum hevði loyst fleiri av teimum trupulleikum, sum umboðsmaðurin hevði víst á. Í viðmerkingum sínum til frágreiðingina frá umboðsmanninum upplýsti Almannaverkið, at Almannaverkið fór at arbeiða fram ímóti at fáa onnur viðurskifti í rættlag í samsvari við frágreiðingina.



# VI Onnur viðgerð og hjálp til borgarar

Umboðsmaðurin hevur ikki skyldu til at taka allar klagur upp til viðgerðar. Ein klaga verður altíð kannað gjølla, áðrenn avgerð verður tikin, um hon skal avvísast. Í tílíkum metingum verður vanliga hugt at, um tað eru útlit fyri, at umboðsmaðurin kann hjálpa viðkomandi.

Ein avvísing av einari klagu kann vera úrslitið av einari víðfevndari málsviðgerð hjá umboðsmanninum.

**Mál, sum vórðu loyst undir klaguviðgerðini, og tí var grundarlag ikki fyri at gera meira við klaguna**

MÁL NR 19/00030
Ein borgari klagaði um, at hann ikki fekk svar frá Tórshavnar kommunu uppá skriv, hann hevði sent kommununi. Umboðsmaðurin vendi sær til Tórshavnar kommunu og vísti á góðan fyrisitingarsið og heitti á kommununa um at svara klagaranum. Kommunan boðaði síðani umboðsmanninum frá, at kommunan nú hevði svarað klagaranum. Umboðsmaðurin boðaði klagaranum frá, at av tí at hann nú hevði fingið svar frá kommununi, gjørdi umboðsmaðurin ikki meira við málið.

MÁL NR 19/00043
Ein pápi klagaði um, at hann ikki helt seg hava fingið innlit í øll tey skjøl í barnaverndarmálinum hjá børnum sínum, sum hann hevði rætt til. Pápin hevði ikki foreldramyndugleika yvir børnunum og hevði tí ikki rætt til partsinnlit eftir § 9 í fyrisitingarlógini.

Umboðsmaðurin vendi sær til barnaverndartænastuna og vísti á § 4 stk. 2 í innlitslógini. Sambært hesi áseting kann hann, hvørs persónligu viðurskifti eru umtalað í einum skjali, í útgangsstøðinum krevja at fáa høvi til at gera seg kunnugan við upplýsingarnar. Umboðsmaðurin bað barnaverndartænastuna taka støðu til, um klagarin átti at fáa innlit í fleiri upplýsingar í skjølum enn tey skjøl, hann longu hevur fingið innlit í.

Barnaverndartænastan boðaði síðani umboðsmanninum frá, at hon hevði avgjørt at geva klagaranum innlit í allar upplýsingar í skjølum og notatum í barnaverndarmálinum, ið snúðu seg um hann. Umboðsmaðurin metti, at málið varð loyst undir klaguviðgerðini, og at grundarlag tí ikki var fyri at gera meira við klaguna.

MÁL NR 19/00071

Eitt barn klagaði til umboðsmannin um, at tað kendi seg ótrygt á stovninum, har tað búði, tí tað svav so langt frá náttarvaktini. Barnið helt eisini, at tað skuldi vera ov tíðliga heima um kvøldarnar. Umboðsmaðurin fór á vitjan hjá barninum og tosaði við barnið og við leiðsluna á stovninum um stúranina og ónøgdina hjá barninum. Leiðslan boðaði stutt aftaná frá, at barnið hevði fingið tilboð um at flyta á eina aðra hædd at búgva, sum var tættari at náttarvaktini, og at barnið var væl nøgt við ætlanina. Barnið skuldi framhaldandi vera heima somu tíð gerandisdagar, tí hetta var mett at vera hóskandi í mun til aldur og skúlagongd hjá barninum. Barnið fekk møguleika at vera longri uppi í vikuskiftunum, og tá serlig tiltøk vóru, í tann mun tað var gagnligt fyri barnið.

Umboðsmaðurin boðaði barninum frá, at hann helt seg hava hjálp barninum við teimum trupulleikum, sum barnið hevði vent sær til hann um, og at umboðsmaðurin tí ikki gjørdi meira við klaguna.

MÁL NR 19/00087

Ein borgari klagaði um, at Klaksvíkar kommuna ikki hevði svarað fyrispurningi sínum um nýtslu av ávísum matrikli í kommununi. Tá hann spurdi eftir málinum, fekk hann at vita, at málið var farið víðari til viðgerð, men so frætti hann einki aftur. Umboðsmaðurin bað kommununa um eina frágreiðing um málið. Klagarin kunnaði síðani umboðsmannin um, at hann umvegis telefon nú hevði fingið nøktandi svar frá Klaksvíkar kommunu og eina umbering fyri, at kommunan ikki hevði svarað honum fyrr. Klagarin takkaði fyri hjálpina og boðaði frá, at nú hann hevði fingið svar, tók hann klaguna aftur.

MÁL NR 19/00093

Ein borgari, sum búði uttanlands, klagaði um, at hann ikki hevði fingið svar frá TAKS uppá ein fyrispurning um rentuskatt av síni eftirlønaruppsparing. Umboðsmaðurin bað TAKS um eina frágreiðing um málið. TAKS svaraði, at fyrispurningurin tíverri ikki var svaraður og bað um umbering fyri mistakið. Samstundis viðurkendi TAKS, at klagarin ikki átti at gjalda skatt í Føroyum av rentuni av síni eftirlønaruppsparing. TAKS upplýsti, at tey vóru í ferð við at rætta feilin og afturrinda klagaranum peningin, sum hann av órøttum var kravdur eftir. Umboðsmaðurin metti tí, at málið var loyst, og at tað ikki var grundarlag fyri at gera meira við klaguna.






# VII Avvístar klagur

Orsøkirnar til, at umboðsmaðurin ikki viðger eina klagu kunnu vera av formligum slag, so sum at klagan kemur ov seint, ella at ovasti myndugleiki á økinum ikki hevur tikið endaliga avgerð í málinum. Flestu klagurnar eru tó avvístar ella ikki viðgjørdar, tí umboðsmaðurin ikki metir seg hava nakað grundarlag fyri at gera nakað við klaguna.

Niðanfyri eru dømir um mál, sum umboðsmaðurin hevur valt at avvísa av ymiskum orsøkum.

**Umboðsmaðurin kann einans viðgera mál, sum eru viðgjørd av myndugleikum ella stovnum, sum hoyra til almennu fyrisitingina**

Sambært § 4 í umboðsmanslógini fevnir virksemi umboðsmansins um allar føroyskar myndugleikar og stovnar v.m., sum sambært fyrisitingarlógini verða roknaðir við til almennu fyrisitingina.

MÁL NR 19/00035

Omman at einum barni, sum var undir barnavernd, klagaði til umboðsmannin og bað umboðsmannin áleggja einum advokati, sum barnaverndartænastan hevði brúkt sum ráðgeva í barnaverndarmálinum, um at svara sær.

Umboðsmaðurin kunnaði klagaran um, at virksemið umboðsmansins fevnir um allar føroyskar myndugleikar og stovnar v.m., sum sambært fyrisitingarlógini verða roknaðir við til almennu fyrisitingina. Advokatar eru ikki partur av almennu fyrisitingini. Umboðsmaðurin kundi tí ikki viðgera klaguna um advokatin.

Klagarin upplýsti fyri umboðsmanninum, at málið snúði seg um innlit í upplýsingar í barnaverndarmálinum.

Umboðsmaðurin vísti á, at klagarin ikki var partur í barnaverndarmálinum og tí ikki hevði rætt til partsinnlit í barnaverndarmálið eftir § 9 í fyrisitingarlógini. Klagarin hevði tó í útgangsstøðinum rætt til innlit í møguligar upplýsingar í barnaverndarmálinum um seg sjálva, sbrt. § 4, stk. 2 í innlitslógini. Umboðsmaðurin bað klagaran venda sær til avvarðandi barnaverndartænastu hesum viðvíkjandi.

**Klagan skal vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klaga verður um, áttu sær stað.**

Sambært § 6, stk. 2 í umboðsmanslógini skal klagan vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað.

MÁL NR. 19/00049
Umboðsmaðurin fekk eina klagu, sum í høvuðsheitum snúði seg um, hvørt ein leigusáttmáli um eina trøð, ið ein granni hjá klagaranum hevði við Jarðarráðið (nú Búnaðarstovan), hevði gildi. Av skjølunum sást, at Jarðarráðið í 1996 byrjaði eina uppsagnartilgongd av leigumálinum. Men eftir at leigarin og Jarðarráðið vóru vorðin samd um ymiskt viðurskifti í sambandi við trøðna, lat Jarðarráðið leigumálið halda fram. Av tí at viðurskiftini um gildi av sáttmálanum, sum klagað varð um, fóru fram meira enn eitt ár, áðrenn klagan varð latin umboðsmanninum, avvísti umboðsmaðurin klaguna.

**Hægsti myndugleiki á økinum skal hava tikið avgerð í málinum, áðrenn umboðsmaðurin kann viðgera eina klagu um eitt mál**

Sambært § 6, stk. 3 í umboðsmanslógini kann ein klaga ikki sendast umboðsmanninum um avgerðir, ið møguligur hægri myndugleiki kann broyta, fyrr enn viðkomandi hægri myndugleiki hevur tikið avgerð í málinum

MÁL NR 19/00072
Ein advokatur klagaði vegna eitt fakfelag um, at Fíggjarmálaráðið hevði staðfest eina avgerð um, at Landssjúkrahúsið setti krav um egnan bil í sambandi við eina starvslýsing eftir økissjúkrarøktarfrøðingi.

Eftir at umboðsmaðurin hevði biðið Fíggjarmálaráðið um frágreiðing um málið, kunnaði Ráðið umboðsmannin um, at Ráðið hevði viðgjørt málið, um kravið til økissjúkrarøktarfrøðingar um atgongd til egnan bil var sakligt ella ósakligt, av nýggjum. Fíggjarmálaráðið og Heilsu- og innlendismálaráðið vóru í hesum sambandi vorðin samd um, at Heilsu- og innlendismálaráðið var rætti klagumyndugleiki í hesum máli. Fíggjarmálaráðið hevði tí sent málið til Heilsu- og innlendismálaráðið, so farast kundi undir eina nýggja klaguviðgerð av málinum.

Umboðsmaðurin boðaði pørtunum frá, at umboðsmaðurin ikki kundi viðgera eina klagu um avgerðina í málinum, fyrr enn Heilsu- og innlendismálaráðið hevði tikið endaliga avgerð í klagumálinum.

MÁL NR 19/00110
Ein pápi klagaði til umboðsmannin um vánaligt samskifti við skúlan hjá barni sínum, og at skúlin ikki vildi geva honum nágreiniliga frágreiðing um uppmøtingina hjá barninum. Pápin búði ikki saman við barninum og hevði ikki foreldramyndugleika yvir barninum.

Umboðsmaðurin boðaði klagaranum frá, at klaga um avgerð, ið ein møguligur hægri fyrisitingarmyndugleiki kann broyta, ikki kann sendast umboðsmanninum, fyrr enn viðkomandi hægri myndugleiki hevur tikið endaliga avgerð í málinum. Umboðsmaðurin kom til, at Uttanríkis- og mentamálaráðið, sum yvirskipaður myndugleiki hjá skúlunum, var rættur klagumyndugleiki í hesum førinum. Í samráð við klagaran varð klagan tí send Uttanríkis- og mentamálaráðnum. Umboðsmaðurin boðaði klagaranum frá, at hann ikki fekk hjálpt klagaranum við málinum í løtuni og tí ikki gjørdi meira við tað.

**Grundarlag er ikki fyri at gera meira við málið**

Sambært § 6, stk. 4 í umboðsmanslógini tekur umboðsmaðurin støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í máli, ið klagað verður um.

MÁL NR 19/00046
Kringvarp Føroya klagaði til umboðsmannin um, at Mentamálaráðið partvíst hevði sýtt fyri at veita innlit í eitt skjal við fleiri fundarfrágreiðingum. Kringvarpið hevði í svarinum frá Mentamálaráðnum fingið at vita, hvørjar frágreiðingar í skjalinum innlit varð givið í, men tað sást ikki í svarinum frá Mentamálaráðnum, hvat hinir partarnir av skjalinum snúðu seg um. Mentamálaráðið greiddi í skrivi til umboðsmannin frá grundgevingunum fyri bara at veita innlit í ein part av skjalinum. Umboðsmaðurin var av somu fatan sum Mentamálaráðið, at nevndu frágreiðingar og viðmerkingar vóru framleiddar til egna nýtslu og vóru av slíkum slag, at tær kundu undantakast innliti vísandi til § 7, stk. 1 í innlitslógini. Umboðsmaðurin hevði tí onga viðmerking til, at Mentamálaráðið hevði sýtt fyri at geva innlit í hesar partarnar av skjalinum men helt, at Mentamálaráðið beinanvegin átti at havt givið klagaranum hesa grundgeving heldur enn bara at vísa til § 7 generelt.

## MÁL NR 19/00053

Umboðsmaðurin fekk eina klagu um handfaringina av einum starvsfólkamáli, sum endaði við, at Almannaverkið og starvsfólkið gjørdu eina fráfaringaravtalu. Fakfelagið hjá viðkomandi starvsfólki hevði góðtikið fráfaringaravtaluna, og starvsfólkið varð umboðað av advokati undir tilgongdini. Sambært avtaluni vórðu øll fíggjarlig og ikki fíggjarlig viðurskifti millum partarnar endaliga avgreidd í sambandi við, at starvið endaði.

Klagað varð um, at Almannaverkið í uppsagnartilgongdini hevði brotið nærum allar reglur, sum eru galdandi fyri uppsagnarmál og mál viðvíkjandi tænastumonnum. Eisini varð ført fram, at almennir myndugleikar ikki eiga at sleppa undan at fylgja vanligum fyrisitingarligum reglum við at gera fráfaringaravtalur.

Umboðsmaðurin vísti í hesum sambandi á tvinnar dómar frá Hægstarætti, sum eru endurgivnir í Ugeskrift for Retsvæsen 2005, bls. 616 og 622. Í dómunum staðfesti Hægstirættur, at einki í fyrisitingarrættinum ella í arbeiðsrættarligu reglunum annars forðar fyri, at gera avtalu um uppsøgn í staðin fyri, at myndugleikin sigur viðkomandi starvsfólk úr starvi, um so er, at avtalan í orðaljóði og uppruna má metast endaliga at avgreiða øll viðurskiftini partanna millum í sambandi við uppsøgnina. Við hesum báðum dómum hendi ein broyting í rættarstøðuni. Dómarnir hava við sær, at myndugleikar sleppa undan at taka støðu til møgulig mistøk og brek í málsviðgerðini í tíðini undan avtaluni. Dómarnir hava somuleiðis við sær, at alment sett starvsfólk kunnu siga frá sær tey rættindi, sum fyrisitingarrættarligu reglurnar, undir hesum reglurnar um partshoyring og grundgeving, eru ætlaðar at geva ímóti ósakligum avgerðum. Av tí at Hægstirættur hevur staðfest, at rættarverjan, sum liggur í fyrisitingarligu reglunum, ikki longur er galdandi í slíkum málum, gerast møguleikarnir hjá umboðsmanninum at kanna slík mál sera avmarkaðir. Hetta ger seg serliga galdandi, tá fráfaringaravtalan avgreiðir øll viðurskifti partanna millum. Vísandi til nevndu dómar, og at fráfaringaravtalan eftir sínum innihaldi avgreiddi øll viðurskiftini partanna millum, gjørdi umboðsmaðurin sambært § 6, stk. 4 í umboðsmanslógini av ikki at gera meira við klaguna.

Í klaguni varð eisini upplýst, at tað var ikki av fríum vilja, at starvsfólkið gjørdi fráfaringaravtaluna, men at orsøkin var trýst frá arbeiðsgevaranum. Til hetta viðmerkti umboðsmaðurin, at hann ikki kundi taka støðu til, um ein slík avtala millum tveir partar kann verða setast til viks, t.d. við grundarlagi í § 36 í avtalulógini. Hesin spurningur kann bara loysast við einum møguligum rættarmáli.



## MÁL NR 19/00084

Ein mamma klagaði um, at ein barnaverndartænastan hevði havt samrøðu við barn sítt, hóast barnaverndarmálið hoyrdi heima í eini aðrari barnaverndartænastu.

Barnaverndartænastan, sum hevði havt samrøðu við barnið, upplýsti, at barnið búði í teirra barnaverndarøki. Barnið hevði vent sær til barnaverndartænastuna á staðnum, tí barnið ynskti at tosa við barnaverndartænastuna um sínar trupulleikar. Barnaverndartænastan hevði greitt barninum frá, at av tí at málið hoyrdi til barnaverndartænastuna í tí kommunu, har mamman búði, fekk barnaverndartænastan ikki gjørt nakað ítøkiligt, men at barnaverndartænastan fór at kunna barnaverndartænastuna, sum hevði barnaverndarmálið um hendi, um samrøðuna og innihaldið í samrøðuni.

Umboðsmaðurin helt, at barnið átti at kunna venda sær til barnaverndartænastuna á staðnum, har tað búði, og kenna seg hoyrt har. Umboðsmaðurin boðaði klagaranum frá, at hann ikki helt grundarlag vera fyri at gera meira við klagu hennara.





*Elinborg Apol, ráðgevi*

# VIII Grein 20 í Barnarættindasáttmálanum – barnsins rættur til umsorgan í fosturheimi og á stovni

> *"Eitt barn, sum fyribils ella støðugt ikki fær verið heima saman við næstingum sínum ella, av tí at tað er best fyri barnið sjálvt, ikki fær loyvi at verða verandi heima, hevur rætt til serliga vernd og stuðul frá landsins myndugleikum". (Grein 20, stk. 1 í Barnarættindasáttmálanum).*

Sambært grein 20, stk. 1 og 2 í Barnarættindasáttmálanum hevur landið ábyrgd av at veita børnum, sum ikki fáa verið í sínum natúrliga familjuumhvørvi, serliga vernd og stuðul og tryggja teimum aðra umsorgan. Millum hesi børn eru tey børn, sum myndugleikarnir yvirtaka umsorganina fyri. Orðingin "rætt til serliga vernd og stuðul" verður í mannarættindahøpi brúkt um serliga viðbreknar bólkar. Rættindini verða roknað

sum sterk rættindi, t.v.s. at landið hevur ábyrgdina av, at ásetingin verður fylgd. Landið hevur skyldu til at geva hesum børnum vernd og stuðul út yvir tað, sum børn vanliga hava tørv á. Verndin og stuðulin skulu laga seg eftir, at børnini eru uttan umsorgan frá foreldrunum og eru serliga viðbrekin.

Sambært grein 20, stk. 3 kann tað at tryggja barninum aðra umsorgan vera, at seta barnið til fosturs ella, um neyðugt, at seta barnið á hóskandi stovn fyri børn. Barnarættindasáttmálin staðfestir sostatt, at fosturheim eigur at verða tikin fram um ein stovn. Barnið eigur bara at verða sett á stovn, um tað er neyðugt, og stovnurin skal hava førleika at geva barninum umsorgan. Tá fosturheim verður valt til barnið, skal hóskandi fyrilit takast fyri samanhangi í uppvøkstrinum hjá barninum og fyri tjóðfrøðiliga, átrúnaðarliga, mentanarliga og málsliga bakstøðinum hjá barninum. Talan er um hóskandi fyrilit og ikki treytaleys krøv. Einki klárt svar er uppá, hvussu nógv barnaverndartænastan skal gera, fyri at fáa hetta at ganga upp.

**Aðrar ásetingar, sum eru tætt knýttar at grein 20**
Aðrar ásetingar í Barnarættindasáttmálanum, sum hava tætt tilknýti til grein 20, eru greinarnar 3, 6, 12, 25 og 39.

*Grein 6 – barnið hevur rætt til at mennast*
Grein 6 er ein av teimum fýra meginreglunum í Barnarættindasáttmálanum. Hon ásetur, at øll børn hava ein natúrligan rætt til lívið, og at landið í størstan møguligan mun skal tryggja, at barnið livir og mennist. Rætturin til umsorgan í grein 20 er ein fortreyt fyri rættinum hjá barninum at mennast væl, bæði kropsliga, sálarliga, andliga, moralskt og sosialt.

*Grein 3 – barnsins besta, trivnaður hjá barninum og krøv til stovnar*
Rætturin til umsorgan í grein 20 knýtir seg eisini til eina aðra meginreglu í Barnarættindasáttmálanum, nevniliga grein 3, stk. 1. Har er ásett, at barnsins tørvur skal setast fremst í øllum tiltøkum viðvíkjandi børnum. Rætturin til umsorgan er ein grundleggjandi treyt fyri at røkja atliti at barnsins tørvi. At barnið hevur rætt til serliga vernd og stuðul merkir, at metast skal um, hvat einstaka barninum tørvar.

Sambært grein 3, stk. 2 skal landið tryggja barninum ta vernd og umsorgan, sum er neyðug fyri barnsins trivnað við fyriliti fyri teimum rættindum og skyldum, sum galda fyri foreldur ella verja barnsins ella onnur, ið hava løgfrøðiliga ábyrgd av barninum, og skulu við tí í huga seta í verk øll hóskandi lóggávulig og fyrisitingarlig tiltøk. Hetta merkir, at tað fyrst og fremst eru foreldrini, sum hava ábygd av at geva barninum umsorgan. Ábyrgdin hjá landinum kemur í øðrum lagi, men landið hevur skyldu til at fyribyrgja, at barnið er fyri harðskapi, ágangi og umsorganarsvíki annars í heiminum. Barnið hevur rætt til ta vernd og umsorgan, sum er neyðug fyri trivnaðin hjá barninum, bæði áðrenn myndugleikarnir yvirtaka umsorganina fyri barninum og aftaná. Málið fyri umsorganini er trivnaðurin hjá barninum, antin umsorganin verður givin í fosturheimi ella á stovni.

Sambært grein 3, stk. 3 skal landið tryggja, at stovnar og tænastur, sum hava ábyrgd av umsorgan ella vernd av barninum, fylgja teimum aðalkrøvum, sum eru sett, serliga við atliti at trygd, heilsu, tal av starvsfólki og førleika hjá starvsfólkunum. Skikkað eftirlit skal vera við hesum. Fyritreytin er sostatt, at aðalkrøv eru sett stovnum og tænastum, og at aðalkrøvini verða tryggja við eftirliti. Viðmerkjast skal, at børn hava tørv á góðum skipanum, har tey kunnu siga frá, um eitthvørt er galið.

ST hevur gjørt leiðreglur fyri stovnar, har t.d. børn, sum myndugleikin hevur yvirtikið umsorganina fyri, búgva (ST-samtykt 64/142. Guidelines for the Alternative Care of Children, 2010). Í leiðreglunum stendur, at stovnarnir eiga at vera smáir og skipaðir við fokus á rættindi og tørvin hjá barninum. Umhvørvið eigur at líkjast mest møguligt støðuni hjá eini familju ella einum lítlum bólki (pkt. 123). Landið skal tryggja, at stovnarnir hava nóg mikið av umsorganarpersónum, soleiðis at hvørt einstakt barn kann fáa framhaldsviðgerð og møguleika til at knýta seg til ein ávísan umsorganarpersón. Umsorganarpersónarnir eiga á fullgóðan hátt at fremja mið og endamál við umsorganararbeiðinum og tryggja barnsins tørv fyri vernd (pkt. 126).

*Grein 12 – barnið hevur rætt til at verða hoyrt*
Eisini meginreglan í grein 12 í Barnarættindasáttmálanum er tætt knýtt at grein 20. Í grein 12, stk. 1 er ásett, at eitt barn, sum er ført fyri at orða síni egnu sjónarmið, hevur rætt til frítt at greiða frá sínum sjónarmiðum í øllum viðurskiftum, sum hava samband við barnið. Dentur skal leggjast á barnsins sjónarmið í samsvari við aldurin á barninum, og hvussu búgvið tað er.

Hendan meginreglan hevur m.a. týdning í sambandi við avgerðina um, hvar barnið skal búgva. Barnið hevur rætt til at verða hoyrt, áðrenn avgerð verður tikin um, hvørt barnið skal búgva í fosturheimi ella á stovni. Avgerðin skal takast eftir eini heildarmeting av barnsins tørvi, sambært grein 3, stk. 1. Stórt atlit skal takast at barnsins sjónarmiði, í hvussu er um talan er um eitt stórt ella búgvi barn. Útgangsstøðið er sum nevnt, at barnið helst ikki skal á stovn at búgva, men hetta kann vera neyðugt, bæði út frá tørvinum hjá barninum, men møguliga eisini eftir ynski frá barninum. Barnið og fosturheimið eiga at hóska saman, og foreldrini at barninum eiga at fáa møguleika at verða við til at velja fosturheimið.

*Grein 25 – barnsins rættur til regluliga meting av setanini*
Sambært grein 25 í Barnarættindasáttmálanum viðurkennir landið rættin hjá einum barni, sum er sett heiman, at fáa røkt, vernd ella viðgerð fyri at bøta um kropsligu ella sálarligu heilsuna, og við millumbilum at fáa eina meting av tí viðgerð, sum tað fær, og øllum øðrum umstøðum viðvíkjandi tí, at tað er sett heiman.

Sambært leiðbeiningini frá ST (ST-samtykt 64/142) hevur barnið, um møguligt minst triðja hvønn mánað, rætt til regluliga og gjølla meting av, um umsorganin og viðgerðin, sum tað fær, er hóskandi. Metingin skal serliga taka atlit at barnsins persónligu menning, møguligum broytingum í barnsins tørvi, um familjuumhvørvið hjá barninum er ment, og hvussu relevant og neyðug núverandi setan av barninum er í mun til nevndu viðurskifti. Metingin skal gerast av skikkaðum og góðkendum persónum og skal fevna um barnið og allir viðkomandi persónar í lívinum hjá barninum (pkt. 67).

*Grein 39 – barnsins rættur til endurmenning*
Sambært grein 39 í Barnarættindasáttmálanum skal landið seta øll hóskandi tiltøk í verk fyri at skunda undir, at børn, sum m.a. hava verið fyri vanrøkt, úrnýtslu ella misnýtslu, píning ella á annan hátt hava verið fyri harðrendari, ómenniskjansligari ella niðrandi viðferð fáa kropsliga og sálarliga heilsubót og koma fyri seg aftur. Endurmenningin skal fara fram í einum umhvørvi, sum stimbrar barnsins heilsu, sjálvsvirðing og virðileika. Eitt barn, sum er sett heiman, hevur rætt til serliga vernd og stuðul frá landinum, sambært grein 20. Landið skal tí syrgja fyri at endurmenna barnið.

Umframt omanfyri nevndu rættindi hava børn, sum búgva í fosturfamilju ella á stovni, øll onnur rættindi, sum øll børn hava eftir Barnarættindasáttmálanum, til heilsu, útbúgving, vernd móti harðskapi v.m.

*Samanumtikið*
Barnarættindasáttmálin gevur einum barni, sum myndugleikin hevur yvirtikið umsorganina fyri, og sum býr í fosturheimi ella á stovni, týdningarmikil rættindi. Barnið hevur rætt til umsorgan og rætt til at menna seg væl við útgangsstøði í tørvinum hjá barninum. Barnið skal hoyrast í øllum viðurskiftum, sum hevur við tað at gera, m.a. í sambandi við val av fosturheimi ella stovni, og barnið hevur rætt til at verða vart móti øllum slagi av harðskapi og ágangi. Setan av barninum í fosturheim skal taka atlit at mentan og framhaldi í uppalingini av barninum, men tá alt kemur til alt, skal barnsins tørvur setast fremst. Viðurskiftini skulu leggjast soleiðis til rættis, at barnið fær ta umsorgan, sum er neyðug, fyri at tað trívist og mennist, antin tað verður sett í fosturheim ella á stovn. Góðar skipanir mugu vera fyri eftirlit við hesum, m.a. skipanir har børn hava møguleika fyri at siga frá.

**Eftirlitsvitjan á deildum hjá Trivnaðareind 10 hjá Almannaverkinum**
Umboðsmaðurin hevur verið á eftirlitsvitjanum á deildum hjá Trivnaðareind 10 hjá Almannaverkinum. Á deildunum búgva børn, sum myndugleikin hevur yvirtikið umsorganina fyri. Í frágreiðingini frá vitjanunum vísti umboðsmaðurin á fleiri viðurskifti, sum kundu betra umstøðurnar hjá børnunum og tryggja teimum serliga vernd og stuðul.

Umboðsmaðurin vísti m.a. á, at fleiri av børnunum høvdu brúk fyri viðgerð frá sálarfrøðingi. Hann mælti til, at fastur sálarfrøðingur varð settur í Trivnaðareind 10, so børnini kundu hava dagligt samskifti við sálarfrøðingin og kenna seg trygg við hann. Við hesum øktist líkindini fyri, at viðgerðirnar av børnunum eydnaðust.

Undir eftirlitsvitjanunum kom fram, at ósemja javnan stakk seg upp millum stovnin og barnaverndartænastuna um, hvør skuldi gjalda fyri ymiskar tænastur til børnini, so sum sálarfrøðiliga hjálp og frítíðarvirksemi hjá børnunum. Umboðsmaðurin vísti á, at børnini høvdu rætt til neyðuga hjálp og umsorgan í rættari tíð, soleiðis at tey kundu mennast. Hann mælti til, at greiða sum skjótast fekst á, hvørjar útreiðslur vóru fevndar av heildartilboðnum hjá Trivnaðareind 10, og hvørjar útreiðslur kommunurnar skuldu gjalda harumframt.

Í sambandi við eftirlitsvitjanirnar kom fram, at nógvur harðskapur var á deildunum hjá Trivnaðareind 10, men at ikki allur harðskapur ella valdsnýtsla varð fráboðað. Umboðsmaðurin vísti á, at tað var týdningarmikið, bæði fyri rættartrygdina hjá børnum og starvsfólkum, at allur harðskapur og øll valdsnýtsla varð skjalfest og fráboðað, soleiðis at staðfestast kundi, hvussu støðan var hesum viðvíkjandi. Hetta kundi møguliga eisini fyribyrgja óhepnari atferð hjá børnunum, sum elvdi til harðskap og hóttanir, soleiðis at harðskapurin minkaði ella hvarv. Umboðsmaðurin mælti til, at stovnurin fekk ein harðskapspolitikk, soleiðis at starvsfólkini vórðu tilvitað um, hvussu tey fyribyrgdu harðskapi, og leiðslan varð tilvitað um, hvussu hon hjálpti starvsfólkum og børnum aftaná harðskapstilburðir.

Umboðsmaðurin vísti á rættin hjá børnum til útbúgving. Ein líkinda skúlagongd var grundarlagið fyri, at barnið fekk eina útbúgving og kundi standa á egnum beinum sum vaksin. Umboðsmaðurin mælti til, at ein ítøkilig meting varð gjørd av, um skúlatilboðið hjá hvørjum einstøkum barni var nøktandi.

Umboðsmaðurin vísti eisini á, at rættindini hjá børnum at verða hoyrd t.d. í sambandi við val av egnum kontaktpersónum og í sambandi við fráboðanir um harðskap og valdsnýtslu.

Hølisviðurskiftini hjá Trivnaðareind 10 viðførdu nógvar flytingar, og hetta tók orku frá starvsfólkunum og skapti ótryggleika hjá børnunum. Samansetingin av børnum á teimum ymisku deildunum var tilvildarlig og uttan mun til sjúkuavgerðir, ella hvussu børnini annars hóskaðu at búgva saman. Hetta var óheppið, tí tað førdi til samanbrestir og harðskap.

Umboðsmaðurin vísti á, at bæði børn og starvsfólk høvdu tørv á støðugleika fyri at kenna seg trygg og kunna virka til fulnar í gerandisdegnum. Ein av fortreytunum fyri, at viðgerðirnar av børnunum skuldu eydnast, og at tey mentust, var, at karmarnir vóru í lagi. Børnini áttu at búgva á tí deild, sum hóskaði best til teirra tørv, soleiðis at uppihaldið á stovninum gjørdist støðugt og væleydnað. Sum meginregla áttu børn við ymiskum sjúkuavgerðum ikki at búgva saman. Umboðsmaðurin metti, at stórur tørvur var á einum nútíðarhóskandi barnaheimi, har børnini kundu fáa tær umstøður og ta viðgerð, umsorgan og tann stuðul, tey høvdu tørv á og rætt til eftir m.a. Barnarættindasáttmálanum.





*Gurið Joensen, ráðgevi*

# IX Vegleiðing

> *Ein fyrisitingarmyndugleiki skal í tørvandi mun veita vegleiðing og hjálp til persónar, sum venda sær til myndugleikan við spurningum innan málsøkið hjá myndugleikanum (§ 7, stk. 1 í Fyrisitingarlógini)*

Myndugleikar hava skyldu til at vegleiða borgarum, sum venda sær til myndugleikan. Skilt verður ímillum vegleiðingarskyldu smb. § 7 stk. 1 í fyrisitingarlógini, vegleiðingarskyldu eftir vanligum rættargrundsetningum og góðum fyrisitingarsiði og vegleiðingarskyldu, sum er ásett í serlóggávu.

**Vanlig vegleiðingarskylda**
Endamálið við vegleiðingarskylduni er at tryggja borgarum neyðuga kunning um rættarstøðu teirra, og soleiðis forða fyri, at teir vegna vantandi vitan, feilir ella misskiljingar verða fyri vanbýti. Myndugleikar skulu í mun til tørvin veita vegleiðing og hjálp til borgarar, sum venda sær til myndugleikan við spurningum innan málsøkið hjá myndugleikanum.

Vegleiðingarskyldan sambært § 7 stk. 1 í fyrisitingarlógini er bert galdandi í mun til mál, har myndugleikin hevur ella fer at taka avgerð smb. § 2 stk. 1 í fyrisitingarlógini. Tað er sostatt ikki eitt krav, at myndugleikin vegleiðir og hjálpir í sambandi við veruligt fyrisitingarvirksemi (faktisk forvaltningsvirksemhed), men myndugleikin skal sambært vanligum rættargrundsetningum og góðum fyrisitingarsiði veita vegleiðing og hjálp til borgarar í sambandi við alt sítt virksemi, herundir eisini í sambandi við veruligt fyrisitingarvirksemi. Myndugleikin kann somuleiðis hava skyldu til at vegleiða í øðrum málum enn avgerðarmálum, um hetta fylgir av serlóggávu, ið er galdandi fyri myndugleikan.

Sambært orðaljóðinum í § 7 stk. 1 er vegleiðingarskyldan bert galdandi, tá borgarin sjálvur vendir sær til myndugleikan. Hóast hetta, er vanliga hugsanin, at vegleiðingarskyldan eisini er galdandi í støðum, har borgarin ikki beinleiðis spyr myndugleikan, men har tað vildi verið natúrligt og viðkomandi at vegleitt borgara, tí tað tyktist sum borgarin ikki kennir síni rættindi. Um borgari hevur biðið um vegleiðing, skal myndugleikin ikki avmarkað vegleiðingina til júst tann spurning, ið borgarin hevur sett, men skal vegleiða um tey viðurskifti, ið eru viðkomandi fyri málið.

Vegleiðingin eftir § 7 stk. 1 í fyrisitingarlógini er eftir sínum orðaljóði bert galdandi innan málsøkið hjá myndugleikanum. Spurningar um onnur málsøki eiga tí so vítt gjørligt at verða sendir ella vístir til annan viðkomandi myndugleika at svara.

Tað veldst um tær ítøkiligu umstøðurnar, hvussu vegleiðingin eigur at vera givin. Tað er onki krav til innihaldið og vavi av vegleiðingini. Vegleiðingin er knýtt at teimum ítøkiligu umstøðunum í málinum, og avgerandi er, at innihaldið í vegleiðingini tryggjar, at borgarin ikki verður fyri tapi av rættindum vegna feilir, vantandi kunnleika ella misskiljingum. Tørvurin á vegleiðing kann vera ymiskur alt eftir, hvønn borgara talan er um, og um hesin hevur serkøna umboðan ella ikki. Vegleiðingin má tí tillagast tí ítøkiliga tørvinum hjá tí einstaka. Myndugleikin skal í hesum sambandi ansa eftir ikki at viðgera málið út í æsir, soleiðis at talan í veruleikanum eru eini forhondsboð um niðurstøðuna í einum komandi ella ítøkiligum máli.

Ein myndugleiki skal eisini hjálpa borgarum í sambandi við at útfylla umsóknir, oyðibløð og annað, um tørvur er á tí, og eisini vegleiða um málsgongdina í málinum og viðkomandi tíðarfreistir.

Vegleiðingin frá myndugleikanum skal, uttan mun til hvussu neyv ella yvirskipað hon er, verða løgfrøðiliga røtt og sonn. Hevur ein myndugleiki givið skeiva ella ófullfíggjaða vegleiðing, eigur myndugleikin sum skjótast og av egnum ávum at rætta vegleiðingina.

Vegleiðingin kann vera skrivlig ella munnlig alt eftir, hvussu umstøðurnar eru. Er vegleiðingin givin munnliga, og talan er um týðandi málsviðgerðarstig í einum avgerðarmáli, skal myndugleikin sum skjótast gera notat um vegleiðingina, so skjalprógv er fyri, hvat vegleitt er um og hvussu.



Myndugleikin skal vanliga tryggja, at móttakarin er førur fyri at skilja vegleiðingina. Eftir umstøðunum kann t.d. verða viðkomandi at bjóða tulkatænasta ella at umseta til annað mál, um hetta eftir umstøðunum í ítøkiliga málinum er neyðugt.

**Serlóggáva um vegleiðingarskyldu**
Umframt vanligu vegleiðingarskyldu eftir § 7 stk. 1 í fyrisitingarlógini kunnu myndugleikar vera álagdir vegleiðingarskyldu í serlóggávu.

Hetta er m.a. galdandi innan almannaøki. Almannaverkið hevur, sambært § 1, stk. 1 og 2, í forsorgarlógini og í kunngerð, fingið álagt eina víðkaða vegleiðingarskyldu. Henda víðkaða vegleiðingarskyldan er eitt slag av heildarvegleiðing, sum inniber, at Almannaverkið ikki bara hevur skyldu at vegleiða alment og persónliga innan almannalóggávuna, men eisini hevur skyldu at bjóða ávísum borgarum framhaldandi vegleiðing, t.e. um viðurskifti, sum kunnu gera borgaran betri føran fyri frameftir at loysa trupulleikar sjálvar um fíggjarlig, arbeiðslig og persónlig viðurskifti.

Umboðsmaðurin viðgjørdi hendan spurning í máli LUM 19/00062, har umboðsmaðurin metti, at klagarin ikki hevði fingið nøktandi vegleiðing í mun til ta strongdu støðu, klagarin var í, og sum gjørdi, at klagarin hevði sagt seg úr starvi og av hesum kom í eina fíggjarliga óhepna støðu.

**Kunning til almenningin**
Sambært góðum fyrisitingarsiði eigur ein myndugleiki at geva borgarum almenna kunning um sítt virksemi og sín praksis. Hetta kann t.d. gerast við kunning á heimasíðuni hjá myndugleikanum, ella við at myndugleikin ger kunningarfaldarar, sum eru alment atkomuligir.

Myndugleikin eigur at tryggja sær, at tær upplýsingar, ið eru atkomuligar á heimasíðu og í faldaranum, eru rættar, greiðar, lættskiljandi og dagførdar.

Kunningarskyldan kann eisini verða ásett í serlóggávum. Almannaverkið hevur sambært kunngerð nr. 38 frá 22. mars 1993 um ráðgevingar- og vegleiðingarskyldu, skyldu til at kunna almenningin um hansara rættindi sambært almannalóggávuni. Kunngerðin ásetur, at hetta kann gerast við leiðbeiningum, lýsingum í dagbløðum, tíðindaskrivum, smáritum, bóklingum v.m. Kunningartilfar til ávísar bólkar av borgarum, sum t.d. avlamis- og fólkapensjónistum v.m., skal verða tillagað eftir tørvinum hjá teimum ymisku bólkunum, og Almannaverkið skal ansa eftir, at kunningartilfarið er til taks á almennum støðum, so sum bókasøvnum, kommunulæknum, sjúkrahúsum, arbeiðisloysisskipanum o.l.

Í Danmark er almenna kunningarskyldan ásett í nýggju offentlighedslógini § 17. Áður fylgdi almenna kunningarskyldan eins og í Føroyum av góðan fyrisitingarsiði og ásetingum í serlóggávu.

**Senda víðari til rætta myndugleika**
Sambært § 7, stk. 2 í fyrisitingarlógini skal ein myndugleiki, sum fær eina skrivliga áheitan, sum ikki viðvíkur málsøkinum hjá honum, um gjørligt senda áheitanina til rætta myndugleika. Vendir ein borgari seg persónliga ella umvegis telefon til skeivan myndugleika, skal myndugleikin vegleiða borgaran um, hvønn myndugleika hann skal venda seg til. Er talan um umsóknir ella kærufreistir v.m., verður móttøkan av skrivi og skjølum roknað sum innkomin, tá tann skeivi myndugleikin móttók skjølini.

Skyldan at senda málið víðari er bert galdandi, um hetta er gjørligt. Er áheitanin so ógreið, at tað ikki við rímiligari vissu kann sigast, hvør er rætti myndugleiki at viðgera áheitanina, hevur ein myndugleiki ikki skyldu at senda málið til annan myndugleika.

Tað kunnu eisini verða serligar umstøður í málinum, sum gera, at myndugleikin ikki sendir tað víðari. Hetta er greitt, um borgarin ikki ynskir hetta, tí talan er um sera privat viðurskifti, sum t.d. revsiverd viðurskifti ella álvarsama sjúku. Myndugleikin skal í slíkum førum vegleiða borgaran um, hvønn myndugleika hann eigur at venda sær til.

**Kæruvegleiðing**
Sambært § 24 í fyrisitingarlógini skulu skrivliga fráboðaðar avgerðir, sum kunnu kærast til annan fyrisitingarmyndugleika, hava vegleiðing um kærumøguleika við tilskilan av kærustovni, upplýsing um mannagongd, tá kært verður, og eina møguliga tíðarfreist. Hetta er tó ikki galdandi um so er, at avgerðin til fulnar gongur viðkomandi á møti. Er noktandi avgerðin fráboðað munnliga, er vanliga vegleiðingarskyldan í § 7 stk. 1 galdandi, og sambært góðum fyrisitingarsiði skal myndugleikin eisini geva kæruvegleiðing, um ein noktandi avgerð verður fráboðað munnliga. Er avgerð og kæruvegleiðing givin munnliga, eigur myndugleikin at gera notat um avgerð og vegleiðing, so hesi viðurskifti eru skjalfest.

Umboðsmaðurin viðgjørdi hesi viðurskifti í grein í ársfrágreiðingini fyri 2015 og í LUM 14/00007. Málið snúði seg um, at Landssjúkrahúsið fráboðaði avgerðir um fylgjara í samband við viðgerð uttanlands, munnliga. Umboðsmaðurin hevði ta fatan, at ein sjúklingur, sum fær noktað fylgjara, eigur at fáa avgerðina fráboðaða skrivliga saman við eini grundgeving. Umboðsmaðurin vísti annars á, at tá tílíkar avgerðir verða fráboðaðar munnliga, er notatskyldan og vegleiðingarskyldan um kæruvegleiðing galdandi.

**Vegleiðing um freistir fyri rættarførslu v.m.**
Sambært § 25 í fyrisitingarlógini skulu avgerðir, sum bert kunnu leggjast fyri dómstólarnar innanfyri eina lógarásetta freist fyri, nær málið skal vera lagt fyri rættin, hava upplýsing um hetta.

Myndugleikin skal ikki bara vísa á møguleikan og freistina fyri at leggja málið fyri rættin, men eisini vísa á, hvønn rætt málið skal leggjast fyri, við adressu og við ávísing um, hvønn málið skal reisast ímóti. Eisini eigur myndugleikin at vísa borgaranum á, at hann kann venda sær til viðkomandi rætt fyri at fáa neyvari vegleiðing um t.d., møguleikarnar fyri rættarhjálp og fríari rættarførslu.



Tað er vanliga ikki ein lógarskylda hjá myndugleikunum at upplýsa borgarar um møguleikan at klaga til Løgtingsins umboðsmann ella til annan eftirlitsmyndugleika sum t.d. kommunala eftirlitið. Hetta er eisini galdandi, hóast freistir kunnu vera tengdar at hesum klagumøguleikum.

Tað fylgir tó av vanligu vegleiðingarskylduni og góðum fyrisitingarsiði, at tá tað má metast at vera tørvur á tí, eigur myndugleikin at upplýsa borgarar um møguleikan at venda sær til ein eftirlitsmyndugleika sum t.d. kommunala eftirlitið ella Løgtingsins umboðsmann. Hetta vil vanliga vera í førum, har tað ikki er nakar fyrisitingarligur kærumøguleiki ella um borgarin spyr, hvørjir klagumøguleikar eru.

**Fylgjur av vantandi ella ikki nøktandi vegleiðing**
Vantandi ella ikki nøktandi vegleiðing vil sum oftast ikki vera avgerandi fyri, um avgerðin er galdandi ella ikki. Men hevur vegleiðingin verið ófullfíggjað ella beinleiðis skeiv, kann hetta, eftir ítøkiligari meting av umstøðunum í málinum, gera, at myndugleikin skal rætta feilin og stilla borgaran, sum um røtt vegleiðing varð givin og borgarin hevði virkað eftir hesum.

Vantandi vegleiðing um freistir fær vanliga ta fylgju, at freistin verður útsett.

Um myndugleikin als ikki hevur givið vegleiðing ella ikki hevur givið nøktandi vegleiðing, og hetta hevur viðført tap av rættindum hjá einum borgara, kann tað, eftir einari ítøkiligari meting av umstøðunum í málinum, føra til endurgjaldskrav.





*Heini Petersen, ráðgevi*

# X Skjalainnlit í dátugrunnar

*Sambært § 5, stk. 2 í innlitslógini fevnir rætturin til skjalainnlit ikki um skráir ella aðrar skipaðar skrásetingar, har sum nýtt verður edv.*
*Hetta merkir m.a., at rætturin til skjalainnlit sum meginregla ikki fevnir um sjálvan dátugrunnin hjá almenna myndugleikanum, t.v.s í tær ráu dáturnar.*

Almennir myndugleikar nýta í dag í stóran mun dátugrunnar í sambandi við málsviðgerð og annað.

Nakrir dátugrunnar verða nýttir í sambandi við goymslu og journalisering av skjølum, t.d. goymslu av elektroniskum skjølum og teldupostum, og sum partur av einari pappírsleysari arbeiðsgongd.

Aðrir dátugrunnar verða nýttir í sambandi útrokningar og samansetingar av tølum frá ymsum geirum. Hesir dátugrunnar eru sum oftast skipaðir á ein sovorðnan hátt, at teir heldur enn at goyma elektronisk skjøl, ið eru liðugt viðgjørd, innihalda eitt hav av upplýsingum, ið eru óviðgjørdar – sokallaðar ráar dátur.

**Rættur til skjalainnlit í elektronisk skjøl og ráar dátur**

Tá ein myndugleiki fær eina umbøn um innlit í ávíst mál, skal myndugleikin gera av, um upplýsingarnar í málinum eru av sovorðnum slagi, at tær eru fevndar av rættinum til skjalainnlit sambært § 5, stk. 1 í innlitslógini.

Sambært § 5, stk. 1 í innlitslógini fevnir rætturin til skjalainnlit um øll skjøl, ið eru partur av einum máli, undir hesum innføringar í journalir, skráir og aðrar skrásetingar viðvíkjandi hesum skjølum.

Skjalahugtakið í § 5, stk. 1 í innlitslógini verður sambært løgfrøðiligum ástøði tulkað vítt og fevnir um eina røð av skjalasløgum. Talan er bæði um skjøl, ið myndugleikin framleiðir sjálvur, eins og skjøl, ið myndugleikin fær sent til sín. Umframt "vanlig" skjøl, eru eisini t.d. ljósmyndir, bíløt av ymsum slagi og skitsur fevndar av hugtakinum.

Í løgfrøðiligum ástøði er dentur eisini lagdur á, at fatanin av skjalahugtakinum ikki skal vera avmarkað av tøknifrøðiligu menningini í samfelagnum. Av hesum ávum fevnir skjalahugtakið bæði um skjøl úr pappíri og skjøl, ið eru elektronisk. Teldupostar eru í hesum høpi sum meginregla at meta sum meinlík elektroniskum skjølum.

Tað er harumframt galdandi, at finst skjalið einans í elektroniskari útgávu, hevur myndugleikin skyldu at gera skjalið tøkniliga atkomuligt hjá tí, ið biðið hevur um innlit. Hetta kann eitt nú gerast soleiðis, at myndugleikin ger eitt útprent av skjalinum, ella at viðkomandi fær møguleika at síggja elektroniska skjalið á einum telduskermi á staðnum.

Sambært § 5, stk. 2 í innlitslógini fevnir rætturin til skjalainnlit ikki um skráir ella aðrar skipaðar skrásetingar, har sum nýtt verður edv.

Hetta merkir m.a., at rætturin til skjalainnlit sum meginregla ikki fevnir um sjálvan dátugrunnin hjá almenna myndugleikanum, t.v.s. í tær ráu dáturnar.

Hóast innlitslógin ikki heimilar, at innlit verður veitt í sjálvan dátugrunnin, er hóast alt møguligt, at innlit kann verða veitt í elektronisk skjøl, ið eru goymd í einum dátugrunni. Við støði í skjalahugtakinum ber til at siga, at tá rætturin til skjalainnlit fevnir um pappírsskjøl, goymd í einum vanligum skjalasavni, fevnir rætturin eisini um samanberandi elektronisk skjøl, ið eru goymd í einum dátugrunni. Tað hevur sostatt ikki týdning fyri rættin til skjalainnlit, hvussu skjøl og upplýsingar eru skapað, ella hvussu tey eru goymd, men heldur at tey kunnu rúmast í skjalahugtakinum.

Hettar samsvarar eisini við tað, ið omanfyri er nevnt, um, at rætturin til skjalainnlit er óheftur av tøknifrøðiligu menningini í samfelagnum, har alt fleiri viðurskifti í dag verða viðgjørd og avgreidd elektroniskt, heldur enn á pappíri.



Avgerandi er tó, at tað er gjørligt at eyðmerkja, hvørji elektronisk skjøl umbønin snýr seg um, smb. § 4, stk. 3 í innlitslógini. Hetta kravið um eyðmerking er tó ikki strangt, og myndugleikin hevur harafturat skyldu at vegleiða um ivi spyrst burturúr einari umbøn um innlit. Myndugleikin skal eisini sambært góðum fyrisitingarsiði sýna fjølmiðlum serligt beinasemi í sambandi við umbønir um innlit, smb. *FOB 1995, s 244*.

Í máli *LUM 201000004* viðgjørdi umboðsmaðurin eitt mál um eina avgerð hjá Fiskimálaráðnum at nokta innlit í fráboðanir frá Atlantic Airways til MRCC um, at bjargingartyrlan ikki var tøk. MRCC hevði móttikið fráboðanirnar frá Atlantic Airways umvegis telefon og noterað upplýsingarnar í eina elektroniska dagbók. Fiskimálaráðið noktaði at geva innlit vísandi til, at rætturin til innlit ikki fevnir um skráir ella skipaðar skrásetingar, har sum nýtt verður edv, smb. § 5, stk. 2 í innlitslógini. Umboðsmaðurin vísti á, at ein myndugleiki ikki kann nokta innliti bara vísandi til, at upplýsingarnar eru førdar inn á edv. Umboðsmaðurin metti, at goymdu upplýsingarnar í elektronisku dagbókini vóru at meta sum elektronisk skjøl, ið høvdu samband við fyrisitingarliga virksemi hjá MRCC og fevnd av almennum innliti.

**Rættur til dátuúrdrátt úr einum dátugrunni**

Sum staðfest er omanfyri, er rætturin til skjalainnlit í ein dátugrunn, avmarkaður til elektronisk skjøl, ið lúka kravið um eyðmerking og samstundis kunnu rúmast í skjalahugtakinum.

Tá staðfest er, at rætturin til skjalainnlit ikki fevnir um tær ráu dáturnar í sjálvum dátugrunninum, er spurningurin, um almenningurin sambært innlitslógini hevur rætt at krevja, at myndugleikin ger ein sokallaðan dátuúrdrátt úr dátugrunninum.

Ein dátuúrdráttur er í høvuðsheitum ein samanseting av upplýsingum úr dátugrunninum, ið kann nýtast til ymisk høvi. Talan er um eina elektroniska viðgerð av teimum ráu dátunum í dátugrunninum. Dátuúrdráttir verða millum annað nýttir, tá talgrundarlag skal finnast í sambandi við útgjald av ymsum peningaligum veitingum.

Sambært § 4, stk. 1, 1. pkt. í innlitslógini er galdandi, at rætturin til skjalainnlit einans er galdandi fyri skjøl, sum ein myndugleiki hevur móttikið ella gjørt sum liður í fyrisitingarligari saksviðgerð í samband við virksemi myndugleikan. Hetta merkir, at rætturin til skjalainnlit einans fevnir um tey skjøl og upplýsingar, ið eru til taks, tá umbønin um innlit er myndugleikanum í hendi. Hetta merkir so eisini, at myndugleikin sambært innlitslógini ikki hevur skyldu at gera ella fáa til vega skjøl ella upplýsingar, ið ikki frammanundan eru til taks í málinum.

Ein dátuúrdráttur verður sambært innlitslógini mettur sum framleiðsla av nýggjum upplýsingum, ið ikki frammanundan eru til taks í einum máli, og av hesum ávum heldur ikki er fevndur av rættinum til skjalainnlit sambært § 5, stk. 1 í innlitslógini.

Í máli LUM 19/00109 viðgjørdi umboðsmaðurin eina klagu um, at Trygdargrunnurin ikki vildi lata Kringvarpi Føroya innlit í upplýsingar viðvíkjandi hýrum í føroyska fiskiflotanum. Umboðsmaðurin helt, at umrøddu upplýsingar vóru av sovorðnum

slagi, at tær kravdu eina ávísa dátuviðgerð at framleiða og vóru tískil ikki fevndar av almennum innliti. Ítøkiliga snúði tað seg um, at Trygdargrunnurin fekk upplýsingar sjálvvirkandi frá ymsum upprunakeldum, ið síðani fóru í eina edv kjarnuskipan hjá grunninum, ið grunnurin nýtti í sambandi við virksemi sítt.

**Rættur til dátuúrdrátt sambært donsku innlitslógini**
Í 2002 setti danska stjórnin eina nevnd "Offentlighedskommisonen" við arbeiðssetninginum at gera uppskot til eina nýggja danska innlitslóg. Nevndin lat úr hondum álit sítt í 2009, ið ber heitið "Betænkning nr. 1510 om offentlighedsloven".

Í 2014 kom nýggj innlitslóg "offentlighedsloven" í gildi í Danmark, ið er grundað á hetta álit.

Í álitinum mælir nevndin m.a. frá, at heimild verður fyri at veita innlit í sjálvan dátugrunnin hjá myndugleikanum.

Hetta er grundað á eina heildarmeting av teimum serligu viðurskiftum, ið gera seg galdandi kring ein dátugrunn. Eitt nú verður víst á, at ein dátugrunnur ikki inniheldur nakað, sum í innlitshøpi kann kallast fyri upplýsingar, fyrr enn brúkarin hevur fingið upplýsingarnar – t.e. tær ráu dáturnar – úr dátugrunninum við at geva skipanini ávís boð um hetta.

Eisini verður víst á, at dátugrunnurin í sjálvum sær ikki kann sigast at vera partur av einum máli, vísandi til, at rætturin til skjalainnlit einans fevnir um skjøl, ið eru partur av einum máli, smb. § 7, stk. 2 í "offentlighedsloven", ið er meinlík § 5, stk. 1 í innlitslógini.

Nevndin mælir hinvegin til, at ásett verður ein rættur hjá almenninginum at fáa til vega dátuúrdrátt úr dátugrunnum myndugleikans. Grundgevingin fyri hesum er tøknifrøðiliga menningin í samfelagnum og økta nýtslan av dátugrunnum innan tað almenna. Nevndin vísur á, at um ikki slíkur rættur verður ásettur, kann tað hava við sær, at rætturin til skjalainnlit í roynd og veru verður avmarkaður vísandi til, at lógin ikki heimilar, at innlit verður veitt í dátugrunnin í sjálvum sær, t.e. tær ráu dáturnar.

Við hesum í huga er nú ásett í § 11 í "offentlighedsloven", at almenningurin sum meginregla kann krevja, at myndugleikin ger ávísan dátuúrdrátt úr dátugrunnum sínum.

Tað er tó ein treyt, at dátuúrdrátturin kann gerast við fáum og einføldum boðum. Hugsanin handan hesa treyt er, at myndugleikin ikki skal hava ov tunga arbeiðsbyrðu av arbeiðinum at gera dátuúrdráttir.

Treytin um fá og einføld boð er eitt nú ikki lokin, um dátuúrdrátturin ikki kann fremjast eftir stuttari tíð, um myndugleikin noyðist at útvega sær upplýsingar, ið ikki frammanundan eru at finna í dátugrunnum myndugleikans ella um myndugleikin noyðist at útvega sær serkunnleika, ið myndugleikin ikki frammanundan hevur ræðið á.





*Sólja í Ólavsstovu, umboðsmaður*

# XI Notatskylda

*Ein myndugleiki eigur at skriva upp innihaldið á øllum upplýsingum, sum hava týdning fyri málsviðgerðina og málsgongdina, og tá ið eitt setanarmál verður lagt til støðutakan í kommunalari nevnd, eigur eitt tilmæli við grundgevingum at fylgja við, soleiðis at nevndin hevur møguleika fyri at taka støðu til, hvør er best egnaður til starvið (LUM 200700009).*

Eftir innlitslógini hevur ein almennur myndugleiki í øllum málum, har ein avgerð skal takast, skyldu til at notera allar upplýsingar, sum myndugleikin fær munnliga, skrivliga ella á annan hátt. Skyldan umfatar allar upplýsingar um tær veruligu umstøður, sum kunnu hava týdning fyri avgerðina í málinum. Skyldan er eisini galdandi fyri uttanhýsis fakligar metingar, sum hava týdning fyri avgerðina í málinum. Notatskyldan er eisini galdandi fyri øll týðandi málsviðgerðarstig, sum verða gjørd í málinum.

**Endamálið við notatskylduni**
Notatskyldan skal tryggja, at møguleiki verður fyri at fáa greiðu á, hvat er hent í einum máli, og at møguligt verður at hava eitt munadygt eftirlit við, at myndugleikin hevur viðgjørt málið rætt. Fyrisitingarliga meginreglan um, at avgerðir, sum myndugleikin tekur, eru sakligar og rættar, treytar, at myndugleikin noterar allar upplýsingar og týdningarmikil málsviðgerastig í øllum málum, har avgerð fer at verða tikin.

Notatskyldan er ásett í § 6, stk. 1, sum er soljóðandi:

> § 6. Í málum, har avgerð fer at verða tikin av einum myndugleika, skal myndugleiki, sum munnliga tekur ímóti upplýsingum viðvíkjandi teimum veruligu umstøðunum, ið hava týdning fyri avgerðina í málinum, ella sum á annan hátt er kunnugur við sovorðnar upplýsingar, skriva upp innihaldið av teimum. Hetta er tó ikki galdandi, um upplýsingarnar annars síggjast í skjølunum í málinum.

Afturat hesari lógaráløgdu notatskyldu, hevur ein fyrisitingarmyndugleiki eisini eina víðkaða notatskyldu, sum byggir á eina ikki-lógarfesta fyrisitingarliga meginreglu. Hendan skyldan fevnir um at skriva upp innihaldið á øllum upplýsingum, sum hava týdning fyri málsviðgerðina og málsgongdina. Myndugleikin skal somuleiðis lýsa málið á nøktandi hátt, áðrenn avgerð verður tikin.

**Skjalfesting og eftirlit**
Notatskyldan hjálpir til, at tað seinni er gjørligt at skjalprógva, at ein avgerð byggir á saklig atlit (*skjalfestingaratlit*), og at tað verður gjørligt at hava eftirlit við, at myndugleikin hevur viðgjørt málið rætt (*eftirlitsatlit*).

Hesi atlit koma m.a. til sjóndar í máli *LUM 14/00007* har Landssjúkrahúsið hevði noktað fylgjara til sjúkraviðgerð uttanlands. Umboðsmaðurin staðfesti, at myndugleikin ikki hevði skjalfest orsøkina til, at Landssjúkrahúsið hevði noktað eini umbøn um fylgjara í sambandi við sjúkraviðgerð uttanlands(*skjalfestingaratlit*), og tí var tað ikki møguligt hjá Kærunevndini í Almannamálum at viðgera kæruna á nøktandi hátt (*eftirlitsatlit*).

Umboðsmaðurin góðtók ikki umberingina frá Landssjúkrahúsinum um, at tað var ov tungt umsitingarliga at geva sjúklingunum eina skrivliga avgerð. Skyldan til at gera notat um viðurskifti, sum hava týdning fyri avgerðina í einum máli, stendur við, til ein avgerð fyriliggur í málinum. Landssjúkrahúsið hevði sostatt skyldu til í hvørjum einstøkum føri at notera upp orsøkina til, at ein sjúklingur fekk noktað einari umbøn um fylgjara í sambandi við sjúkraviðgerð uttanlands.

Av tí at onki var noterað í einum setanarmáli *LUM 14/00038* fekk umboðsmaðurin ikki eftirkannað, um avgerðin var saklig og røtt. Umboðsmaðurin sá seg ikki føran fyri at meta um, um avgerðin ikki at hava setanarsamrøður var tann rætta, tí onki notat var skrivað frá tí munnliga orðaskifti, sum fór fram millum kommunustýrislimir í sambandi við setanarmálið, og um ta ítøkiligu metingina av førleikum hjá umsøkjarunum. Einki tilmæli var gjørt um, hví mett varð, at tann setti var best egnaður til starvið, og hví kommunan ikki helt tað vera neyðugt at hava setanarsamrøður.



Sama gjørdi seg galdandi í máli *LUM 16/00024*. Hóast allir umsøkjararnir vóru til samrøðu viðvíkjandi starvinum, var einki notat skrivað frá samrøðunum. Einki notat var skrivað viðvíkjandi ítøkiligu metingunum av førleikunum hjá umsøkjarunum, og heldur ikki sást nakað tilmæli vera gjørt um, hví mett varð, at tann setti var best egnaður til starvið. Fyri at prógva, at rætti umsøkjari var settur í starv, átti myndugleikin at notera tær metingar, ið vórðu gjørdar undir setanartilgongdini. Hetta fyri at møguleiki var fyri einum munadyggum eftirliti við, at myndugleikin hevði borið seg rætt at, og at málsviðgerðin var farin rætt fram.

Í máli *LUM 200700016* varð klagarin ikki boðin til setanarsamrøðu, hóast klagarin leyk øll førleikakrøvini í starvslýsingini. Klagarin var ikki føroyingur av uppruna, men var hetta ikki ein treyt í lýsingini. Hóast klagarin var einasti umsøkjari, sum leyk øll krøvini í lýsingini, varð viðkomandi ikki boðin til samrøðu. Setanarmyndugleikin hevði einki notat skrivað, sum lýsti setanartilgongdina; einki notat viðvíkjandi ítøkiligari meting av førleika hjá umsøkjarunum; einki notat um, hvat setanarbólkurin hevði lagt til grund, tá ið bólkurin bert hevði valt at bjóða tveimum umsøkjarum til samrøðu; einki notat frá teimum báðum setanarsamrøðunum; og einki notat um, hví tann eini umsøkjarin varð mettur at verða best egnaður til starvið. Umboðsmaðurin dugdi tí ikki at síggja nakra sakliga grundgeving fyri, at klagarin ikki varð boðin til setanarsamrøðu ella settur í starv. Umboðsmaðurin skilti tí væl, at klagarin segði seg hava varhugan av, at tann veruliga grundgevingin var uppruni klagarans. Umboðsmaðurin heitti á myndugleikan um at taka málið til nýggja viðgerð, tí tann umsøkjarin, sum sambært starvslýsingini tyktist best skikkaður til starvið, ikki varð boðin til setanarsamrøðu, og tí var tað ivasamt, um umsóknin hevði fingið nakra veruliga viðgerð.

Í máli *LUM 18/00044* staðfesti umboðsmaðurin, at týðandi samstarvstrupulleikar vóru á arbeiðsplássinum, og at greitt samband var millum samstarvstrupulleikarnar og klagaran. Út frá skjalatilfarinum var tó ikki greitt, at tað var klagarin, sum var høvuðsatvoldin til, at samstarvstrupulleikarnir tóku seg upp og hildu fram, tí einki var skjalfest í uppritunum um orsøkirnar til ósemjurnar. Heldur ikki var skjalfest í uppritum frá samrøðum, sum klagarin hevði havt við leiðara sín, um talan var um rættleiðandi samrøður, har klagarin fekk ábreiðslur ella munnliga ávaring fyri atburð sín. Ongar upplýsingar vóru í málinum um, at samstarvstrupulleikarnir høvdu týðandi neiliga ávirkan á, hvussu uppgávurnar á arbeiðsplássinum vórðu loystar. Umboðsmaðurin vísti á, at í einum uppsagnarmáli, sum er grundað á samstarvstrupulleikar, er tað týdningarmikið, at skjalfesta fráboðanir og samrøður, sum lýsa orsøkirnar til, at ósemjur koma í, og um samrøðurnar við starvsfólki eru rættleiðandi, og um ábreiðsla ella ávaring verður givin undir samrøðunum. Umboðsmaðurin helt ikki, at myndugleikin kundi prógvað, at tað var klagarin, sum var høvuðsatvoldin til samstarvstrupulleikarnar, og heitti tí á myndugleikan um at taka málið upp til nýggja viðgerð.

**Ólógarásett rættargrundregla og góður fyrisitingarsiður**
Tann formliga notatskyldan er í sínum orðaljóði bara galdandi fyri mál, har myndugleiki fer at taka fyrisitingarrættarliga avgerð, og ikki har myndugleikin ásetir almennar reglur í kunngerð ella rundskrivi, ella tá talan er um veruligt fyrisitingarvirksemi (*faktisk forvaltning*).

Tað liggur tó í sjálvum hugtøkunum um mál og málsviðgerð og skjøl, sum eru grundleggjandi í fyrisitingarrættinum, at um talan er um eina viðgerð, so eiga málsviðgerastigini, sum hava týdning fyri málið, at vera skjalfest.

Í máli um vantandi loyvi at fiska makrel *LUM 14/00045* dugdi umboðsmaðurin ikki út frá skjølunum í málunum at síggja, hvørji atlit vóru tikin, tá kunngerðin um býtið av makrelkvotuni varð tilevnað. Umboðsmaðurin helt ikki nakað vera til hindurs fyri, at politikarar luttaka í arbeiðinum at tilevna kunngerðir, men vísti á, at bæði politikarar og embætisfólk í hesum arbeiði, eins og í vanligari málsviðgerð, eru bundin at fyrisitingarligum meginreglum um upplýsingarskyldu og sakliga fyrisiting. Umboðsmaðurin helt nógv benda á, at viðgerðin av kvotubýtinum einans hevði verið politisk. Einki notat var skrivað frá fundarvirkseminum hjá bólkinum, sum hevði ásett makrelbýtið, og umboðsmaðurin metti seg tí ikki hava møguleika fyri at siga, um býtið til ymisku skipabólkarnar var grundað á saklig og viðkomandi atlit. Umboðsmaðurin helt tað vera átaluvert, at einki notat var skrivað frá fundum í bólkinum í sambandi við makrelbýtið, og at viðgerðin av makrelbýtinum eftir øllum at døma ikki var farin fram eftir vanligum fyrisitingarrættarligum reglum.

Harumframt áleggur góður fyrisitingarsiður einum myndugleika at skriva upp málsviðgerðarstig, sum hava týdning fyri mál, sjálvt um talan ikki er um eitt avgerðarmál eftir fyrisitingarlógini.

Umboðsmaðurin kom í máli *LUM 18/00071* til ta niðurstøðu í sambandi við, at TAKS setti upp forboðsskeltir fyri mynda- og videoupptøkum í "tollfiltrinum", at talan ikki var um eina fyrisitingarliga avgerð, men um útinning av ræðisrættinum hjá TAKS yvir økinum. Umboðsmaðurin metti tó, at TAKS, sambært góðum fyrisitingarsiði, átti at havt skjalfest samskiftið millum lógardeildina og deildarleiðaran á Tolldeildini, so tað hevði verið lætt at staðfest, nær forboðsskeltini vórðu sett upp, hvat øki forboðið snúði seg um, hvørji atlit vóru grundarlag fyri forboðnum, og um hesi vóru saklig og í samsvari við fyrisitingarligar grundreglur

Í máli *LUM 17/00054* staðfesti umboðsmaðurin, at ein flyting av starvsfólki ikki var ein avgerð í vanligum týdningi, men heldur veruligt fyrisitingarvirksemi, sum ikki var fevnt av notatskylduni í innlitslógini. Hóast hetta helt umboðsmaðurin, at kommunan eftir góðum fyrisitingarligum siði átti at havt skrivað upp øll týðandi stig í málinum. Umboðsmaðurin heitti á kommununa um at minnast til at skriva upp allar tær upplýsingar, sum eru viðkomandi fyri, at býráðið kann taka eina avgerð á fullgóðum grundarlagi.

**Notatskyldan ikki galdandi í ávísum førum**
Notatskyldan umfatar ikki fakligar metingarnar hjá starvsfólki um, hvussu avgerðin í einum máli skal loysast. Skyldan er heldur ikki galdandi fyri ta áskoðan ella sannføring eitt starvsfólk hevur til, hvussu avgerðin í einum máli, skal vera.

Harumframt eru tað bara upplýsingar, sum eru viðkomandi og hava týdning fyri eitt mál, sum skulu noterast í málið. Upplýsingar, sum eru at finna í øðrum skjølum o.l. ella sum eru uttan týdning fyri avgerðina í einum máli, eru ikki neyðugar at notera í málið. Upplýsingar, sum einans kunnu ávirka avgerðina á ósakligan hátt, eiga ikki at verða noteraðar.

Dømi um upplýsingar, sum ikki eiga at verða noteraðar í eitt mál, sæst í máli *LUM 200500069*. Í hesum ítøkiliga máli hevði Arbeiðsloysisskipanin í einum telefonnotati noterað, at klagarin sambært munnligum upplýsingum frá Toll- og Skattstovu Føroya skuldi vera ein "Ebeneser-maður burturav". Umboðsmaðurin dugdi ikki at síggja, at trúarviðurskifti hevði nakran týdning yvirhøvur fyri eitt starv sum málsviðgeri hjá Arbeiðsloysisskipanini. Hendan upplýsing kundi tí einans vera við til at ávirka avgerðina á ósakligan hátt, og átti tí ikki at verið noterað. Harafturat helt umboðsmaðurin ikki, at telefonnotatið leyk tey krøv, ið mugu stillast til slík notat, t.v.s. at tað framgongur greitt, hvør hevur skrivað notatið, hvønn tosað er við, dagfesting og nær samrøðan hevur verið.

**Avleiðing av at notatskyldan verður brotin**
Í tann mun ein fyrisitingarmyndugleiki ikki heldur notatskylduna, kann hetta eftir umstøðunum hava týdning fyri at prógva grundarlagið undir eini avgerð. Tað kann soleiðis verða torført hjá myndugleikanum at lyfta próvbyrðuna fyri, at ein avgerð er saklig og í samsvari við fyrisitingarrættin.

Úrslitið av hesum kann verða, at eftirlitsmyndugleikin antin ógildar avgerðina ella heitir á myndugleikan um at taka málið upp til nýggja viðgerð.



# XII Skjøl

## Skjal 1

**Løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann**

**1. partur**

**Umboðsmaðurin og Løgtingið**
§ 1. Løgtingið velur ein uttantingsmann fyri eitt 5 ára skeið at hava innlit við fyrisiting heimastýrisins.
2. stk. Doyr umboðsmaðurin í embætistíð síni ella er hann av øðrum orsøkum ikki førur fyri at røkja starv sítt, ger formansskapur Løgtingsins av, hvør skal røkja starvið, til Løgtingið velur ein nýggjan umboðsmann. Tað sama er galdandi, um umboðsmaðurin biður um at verða loystur úr starvi, ella um Løgtingið loysir hann úr starvi smb. stk. 3.
3. stk. Hevur Løgtingið ikki longur álit á umboðsmanninum, kunnu tveir triðingar av løgtingsmonnunum loysa hendan úr starvi.

§ 2. Umboðsmaðurin, ið ikki kann sita á Løgtingi ella í kommunustýri, skal so vítt gjørligt hava løgfrøðiliga útbúgving.

§ 3. Við løgtingslóg kunnu verða gjørdar almennar reglur fyri virksemi umboðsmansins. Annars er umboðsmaðurin í starvi sínum óheftur av Løgtinginum.

**2. partur**

**Heimildir**
§ 4. Virksemið umboðsmansins fevnir um alla fyrisiting heimastýrisins (t.e. lands- og kommunalu), og viðurskifti hjá børnum á privatum stovnum v.m., hvørs uppgávur beinleiðis viðvíkja børnum.
2. stk. Lógin er eisini galdandi fyri feløg, stovnar, felagsskapir v.m., ið verða roknað við til almennu fyrisitingina sambært fyrisitingarlógini, lógini um alment innlit ella lógini um viðgerð av persónsupplýsingum.
3. stk. Í meting sínari av kommunalari umsiting skal umboðsmaðurin vísa atlit til tær serligu umstøður, kommunufyrisiting virkar undir.
4.stk. Interkommunalir felagsskapir eru undirlagdir virksemi umboðsmansins.
5. stk. Virksemi umboðsmansins fevnir ikki um ríkismyndugleikar, Løgtingið og stovnar undir Løgtinginum.

§ 5. Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at tær í § 4 nevndu umsitingareindir ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum.

## 3. partur

**Kærumál og egin mál**
§ 6. Ein og hvør kann senda umboðsmanninum klagu um tær í § 4 nevndu umsitingareindir.
2. stk. Tann, ið klagar, skal navngeva seg í klaguni. Klagan skal vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað.
3. stk. Klaga um avgerðir, ið møguligur hægri umsitingarmyndugleiki kann broyta, kann ikki sendast umboðsmanninum, fyrr enn viðkomandi hægri myndugleiki hevur tikið avgerð í málinum. Freistin, ið er nevnd í 2. stk., skal í slíkum førum roknast frá tí degi, hægri myndugleikin tekur avgerð sína.
4. stk. Umboðsmaðurin tekur støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í máli, ið klagað verður um.
5. stk.Umboðsmaðurin kann sjálvur taka eitt mál til viðgerðar og fremja neyðugar kanningar í hesum sambandi.
6. stk. Umboðsmaðurin kann kanna viðgerðina hjá myndugleikunum av útvaldum málum.
7. stk. Umboðsmaðurin kann kanna allar stovnar, myndugleikar og tænastustøð, sum eru fevnd av virkisøkinum hjá umboðsmanninum.

## 4. partur

**Kanningar**
§ 7. Ger umboðsmaðurin av at taka eina klagu til viðgerðar, skal hann beinanvegin kunna viðkomandi umsiting um innihaldið í klaguni, um ikki vandi er fyri, at hetta kann darva kanningini. Harumframt skal umsitingin biðjast um ummæli í málinum, áðrenn umboðsmaðurin tekur avgerð um at gera vart við meting sína av málinum smb. § 10, stk. 2. Umboðsmaðurin kann áseta tíðarfreist til ummæli.

§ 8. Tær í § 4 nevndu umsitingar hava skyldu at geva umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram øll tey skjøl, sum hesin embætis vegna krevur at fáa fyrilagt.
2. stk. Umboðsmaðurin kann stevna fólki í rættin at vitna um viðurskifti, ið eru avgerandi í kanningararbeiðinum. Í slíkum førum eru reglurnar í rættargangslógini galdandi. Rættarfundirnir eru ikki almennir. Tann, ið klagan viðvíkur, hevur saman við hjáseta rætt at vera hjástaddur, meðan slík vitnisførsla fer fram.
3. stk. Umboðsmaðurin hevur rætt til at vitja støð, ið kannað verða, og hann hevur fría atgongd til at gera kanningar í øllum neyðugum hølum.
4. stk. Metir umboðsmaðurin tað vera neyðugt, kann hann uttan rættarúrskurð kanna privatar stovnar v.m., hvørs uppgávur beinleiðis viðvíkja børnum, sbrt. § 4, stk. 1.

§ 9. Umboðsmaðurin hevur tagnarskyldu um tey viðurskifti, hann í virksemi sínum fær kunnleika til. Tagnarskyldan stendur við, eftir at umboðsmaðurin fer úr starvi, og fevnir eisini um starvsfólk á umboðsmansstovninum.



## 5. partur

**Niðurstøður**
§ 10. Kemur umboðsmaðurin til ta niðurstøðu, at álvarsligt mistak ella vansketni er framt av einum av teimum í § 4 nevndu umsitingum, skal umboðsmaðurin boða formansskapi Løgtingsins, løgmanni og viðkomandi landsstýrismanni og /ella kommunustýri frá hesum og koma við tilmæli til teirra.
2. stk. Umboðsmaðurin hevur rætt til alment at finnast at, koma við tilmælum, og á annan hátt gera vart við meting sína av máli, hann hevur kannað.
3. stk. Umboðsmaðurin kann mæla viðkomandi myndugleikum til, at fríur rættargangur verður givin, smb. rættargangslógini §§ 330 –336c, í málum, sum hava verið viðgjørd eftir hesi lóg.

§ 11. Umboðsmaðurin letur Løgtinginum ársfrágreiðing um arbeiðið sítt. Frágreiðingin verður almannakunngjørd áðrenn 1. juli.
2. stk. Boðar umboðsmaðurin Løgtinginum, landstýrismanni ella kommunustýri frá einum máli, ella tekur hann eitt mál við í ársfrágreiðing sína, skal hann upplýsa um, hvat viðkomandi hevur ført fram til verju sína.

§ 12. Rakar umboðsmaðurin við lýti í galdandi lógum, fyriskipanum ella umsitingarligum avgerðum, skal umboðsmaðurin boða Løgtingi og viðkomandi landsstýrismanni frá hesum. Er talan um viðurskifti, ið viðvíkja kommunalari ella interkommunalari umsiting, skal umboðsmaðurin eisini boða viðkomandi kommunustýri frá.
2. stk. Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, um galdandi lógir og fyrisitingarligar ásetingar eru sambæriligar við altjóða skyldur at tryggja barnarættindi, herundir sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá børnum. Rakar umboðsmaðurin við lýti í hesum sambandi, skal umboðsmaðurin boða Løgtingi og viðkomandi landsstýrismanni frá hesum. Er talan um lýti í ásetingum, ásettar av eini kommunu, skal umboðsmaðurin boða viðkomandi kommunustýri frá.

§ 13. Um umboðsmaðurin krevur tað, kunnu dómstólarnir vísa frá sær privatmál móti umboðsmanninum vegna avgerðir, sum hann tekur við grundarlagið í hesi lóg.

## 6. partur

**Lønar- og eftirlønarviðurskifti**
§ 14. Lønarviðurskifti umboðsmansins, herundir eisini spurningin um eftirløn og bíðipening, verða ásett við løgtingslóg.
2. stk. Umboðsmaðurin kann ikki, uttan við loyvi Løgtingsins, vera í starvi hjá almennum ella privatum fyritøkum, virkjum ella stovnum.
3. stk. Møguligur spurningur um ógegni umboðsmansins í ávísari søk verður lagdur fyri formansskap Løgtingsins, sum, um mett verður, at talan er um ógegnið, útnevnir annan at viðgera hetta ávísa mál.

§ 15. Umboðsmaðurin kann krevja at verða loystur úr starvi við seks mánaða freist at galda frá seinasta degi í einum mánaði.

**7. partur**

**Fyrisiting**
§ 16. Umboðsmaðurin setir og loysir úr starvi starvsfólk síni.

§ 17. Tær útreiðslur, ið standast av umboðsmansstovninum, verða játtaðar á Løgtingsins fíggjarlóg.
2. stk. Umboðsmaðurin ger roknskap fyri virksemi stovnsins, hesin skal vera grannskoðaður av grannskoðara Løgtingsins.

**8. partur**

**Ígildisreglur**
§ 18. Henda lóg kemur í gildi 1. januar ár 2001.
2. stk. Klagur um viðurskifti í tíðarskeiðinum 1. januar 2000 og til henda lóg kemur í gildi, kunnu kortini leggjast fyri umboðsmannin til viðgerðar.

# Skjal 2

***Vegleiðingin um Løgtingsins umboðsmann***

**Hvønn og hvat kunnu tygum klaga um**
Umboðsmaðurin hevur eftirlit við allari fyrisitingini undir heimastýrinum, t.v.s. bæði lands-, kommunalu og interkommunalu myndugleikunum.

Umboðsmaðurin kann viðgera klagur um avgerðir hjá myndugleikunum, eins og viðferð teirra av borgarum og málum.

Tygum kunnu t.d. klaga um eina noktan av einari umsókn, um tann valda viðgerðarháttin, um ta tíðina, sum hetta hevur tikið og / ella framferðarháttin hjá embætisfólkunum.

Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at myndugleikarnir ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum.

Dómstólarnir, Løgtingið, feløg og privatir persónar eru ikki almennir fyrisitingarmyndugleikar. Tí kann umboðsmaðurin ikki viðgera klagur um hesi. Donsku myndugleikarnir, sum t.d. løgreglan, hoyra ikki undir heimastýrið. Tí kann umboðsmaðurin heldur ikki viðgera klagur um hesar. Um tygum eru í iva um, hvørt tygum kunnu klaga til umboðsmannin um ein ávísan myndugleika, kunnu tygum altíð spyrja okkum.

**Hvussu kunnu tygum klaga**
Um tygum ynskja at klaga, skulu tygum skriva til umboðsmannin og greiða frá, hvønn og hvat tygum ynskja at klaga um. Um tygum hava latið onkran annan klaga tygara vegna, skulu tygum leggja eina undirskrivaða fulltrú við klaguni. Tað lættir um málsviðgerðina, um tygum senda møgulig viðkomandi skjøl (brøv frá tygum, svar frá myndugleikunum o.s.fr.) saman við klaguni. Á hendan hátt fáa tygum eisini ofta skjótari svar, tí umboðsmaðurin vanliga hevur tørv á at síggja hesi skjøl.

**Hvat kann umboðsmaðurin gera**
Um umboðsmaðurin eftir at hava kannað málið kemur til ta niðurstøðu, at hann gevur viðkomandi viðhald, kann hann finnast at tí myndugleikanum, sum klagan snýr seg um. Umboðsmaðurin kann eisini heita á myndugleikan um at umhugsa málið av nýggjum og taka eina aðra avgerð. Leggið til merkis, at umboðsmaðurin ikki sjálvur kann broyta eina avgerð. Uppgávan hjá umboðsmanninum er sostatt at greiða myndugleikanum frá, at hesin eftir hansara fatan hevur gjørt eitt mistak.

Í hesum sambandi skulu tygum hava í huga, at umboðsmaðurin hevur avmarkaðar møguleikar fyri at taka støðu til avgerðir, ið eru grundaðar á reinar metingar ella avgerðir, har tað krevst ein serligur førleiki (t.d. læknaligur).

**Hvat hendir, tá umboðsmaðurin fær eina klagu**
Umboðsmaðurin hevur 3 møguleikar at svara eini klagu:

1. Klagan verður kannað nærri.
2. Klagan verður avvíst, tí at umboðsmaðurin ikki kann viðgera hana.
3. Umboðsmaðurin velur ikki at kanna málið.

***1. Klagan verður kannað nærri.***
Heldur umboðsmaðurin, at ein klaga skal kannast nærri, sendir hann hana til viðkomandi myndugleika og biður um eina viðmerking. Samstundis biður hann eisini um at læna møgulig skjøl í málinum. Viðmerkingin frá myndugleikanum verður vanliga send viðkomandi, sum fær møguleika at gera sínar viðmerkingar.

Hann, ið hevur klagað, verður vanliga kunnaður um gongdina í málinum.

Tá myndugleikin og viðkomandi hava gjørt sínar viðmerkingar til málið, er hetta vanliga klárt til endaligu niðurstøðu umboðsmansins. Alt eftir, hvussu nógv mál eru til viðgerðar hjá umboðsmanninum samstundis, og hvussu skjótt myndugleikarnir svara umboðsmanninum, mugu tygum rokna við, at tað kann ganga umleið eitt hálvt ár, áðrenn málið er liðugt viðgjørt.

***2. Klagan verður avvíst.***
Løgtingið hevur í umboðsmanslógini (lóg nr. 60 frá 10. mai 2000) sett mark fyri, nær umboðsmaðurin kann viðgera eina klagu:

"*Klaga um avgerðir, ið møguligur hægri umsitingarmyndugleiki kann broyta, kann ikki sendast umboðsmanninum, fyrr enn viðkomandi hægri myndugleiki hevur tikið avgerð í málinum...*" *(§ 6, stk. 3)*"

Um tað er møguligt at kæra eina avgerð til ein annan fyrisitingarmyndugleika, skal hetta sostatt verða roynt, áðrenn umboðsmaðurin kann viðgera málið. Avgerðir, sum verða fráboðaðar skrivliga, skulu geva eina vegleiðing um møguligar kærumøguleikar, áðrenn farast kann til umboðsmannin. Eru tygum í iva, kunnu tygum venda tygum til myndugleikan, sum hevur tikið avgerðina, ella møguliga til skrivstovuna hjá umboðsmanninum.

"… Klagan skal vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað." (§ 6, stk. 2)

Orðingin "viðurskifti" fevnir um alt, sum klagast kann um til umboðsmannin, t.d. viðgerðina av einum máli, málsviðgerðartíðina, avgerðina í málinum, atburðin o.s.fr. Klaga tygum um eina avgerð, skal hendan sostatt verða tikin innanfyri tað seinasta árið.

Inniheldur klagan til umboðsmannin viðurskifti, sum myndugleikin ikki áður hevur tikið støðu til, sendir umboðsmaðurin næstan altíð klaguna víðari til myndugleikan og biður hendan taka støðu til hesi viðurskiftini. Samstundis verður viðkomandi kunnaður um hetta, og biðin um at bíða við at klaga til umboðsmannin, til myndugleikin hevur tikið støðu í málinum. Kemur eingin nýggj klaga, ger umboðsmaðurin ikki meira við málið.

***3. Umboðsmaðurin velur ikki at kanna málið.***
Í umboðsmanslógini stendur:

"*Umboðsmaðurin tekur støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í máli, ið klagað verður um.*" (§ 6, stk. 4)

Umboðsmaðurin hevur sostatt ikki skyldu til at taka allar klagur upp til viðgerðar. Hann kann nokta at viðgera klaguna sum heild ella bert at viðgera ávís viðurskifti í hesari.

Umboðsmaðurin kannar altíð eina klagu gjølla, áðrenn hann tekur avgerð um at avvísa hana. Í tílíkum metingum verður vanliga hugt at, um tað eru útlit fyri, at umboðsmaðurin kann hjálpa viðkomandi.

Ofta skrivar ella ringir umboðsmaðurin til viðkomandi ella til myndugleikan, fyri at hava eitt trygt grundarlag fyri avgerð síni. T.d. kann hann biðja um skjølini í málinum.

Ein avvísing av at viðgera eina klagu kann sostatt vera úrslitið av einari víðfevndari málsviðgerð hjá umboðsmanninum.

**Umboðsmaðurin kann sjálvur taka eitt mál til viðgerðar**
Umboðsmaðurin kann eisini kanna eitt mál, uttan at tað finst nøkur klaga hesum viðvíkjandi. Umrøða í fjølmiðlunum kann t.d. hava við sær, at umboðsmaðurin gerst varur við eitt mál, sum hann ynskir at kanna nærri. Onkuntíð kunnu klagur vera orsøk til, at umboðsmaðurin fer at kanna viðurskifti, sum tað ikki er klagað um.



Umboðsmaðurin kann sambært §§ 6, stk. 5 og 8, stk. 3 kanna stovnar og tænastustøð v.m., ið hoyra til virkisøki hansara.

**Um umboðsmannin og embætið**
Løgtingið velur fimta hvørt ár ein Løgtingsins umboðsmann. Hevur Løgtingið ikki longur álit á umboðsmanninum kunnu 2/3 av limunum loysa hann úr starvi.

Umboðsmaðurin setir og loysir úr starvi starvsfólk síni.

Tygum kunnu ringja á tlf. 35 85 00, skriva teldupost til lum@lum.fo ella venda tygum til skrivstovuna undir Bryggjubakka 11, Tórshavn, um tygum hava spurningar.

# Skjal 3

**Yvirlit yvir endaliga viðgjørdar klagur og kanningar í 2019, har álit varð skrivað**

Málini kunnu lesast á www.lum.fo

| Dagfesting | Mál nr. | Heiti |
|---|---|---|
| 07-02-2019 | 18/00081 | Klaga um málsviðgerðartíð hjá Umhvørvisstovuni, Matrikulstovuni, í.s.v. umsókn um ummatrikulering |
| 28-02-2019 | 17/00081 | Klaga um málsviðgerðartíð og vantandi svar frá Umhvørvisstovuni |
| 06-03-2019 | 18/00092 | Kanning av mannagongdunum hjá Tórshavnar kommunu í sambandi við grannahoyringar |
| 20-03-2019 | 17/00048 | Eftirlitsvitjanir í Trivnaðareind 10 hjá Almannaverkinum |
| 03-04-2019 | 18/00064 | Klaga um uppsøgn av formanninum fyri húsavørðarnar í Tórshavnar kommunu vegna samstarvstrupulleikar |
| 08-04-2019 | 18/00071 | Klaga um vantandi mannagongdir, tá TAKS setti forboðsskeltir upp á tolløkinum á flogvøllinum í Vágum |
| 15-04-2019 | 18/00044 | Klaga um uppsøgn av starvsfólki í Barnatannrøktini í Tórshavnar kommunu vegna samstarvstrupulleikar |
| 13-05-2019 | 18/00089 | Klaga um vantandi svar frá Fugloyar kommunu uppá eina innlitsumbøn |
| 27-05-2019 | 18/00030 | Klaga um at Bú- og Heimatænastan í Suðuroy krevur læknaváttan eftir 2. sjúkradag |
| 03-06-2019 | 18/00023 | Klaga um vantandi svar frá Tórshavnar kommunu um útgjald av frítíðarískoyti og frítíðarløn |
| 15-07-2019 | 18/00117 | Klaga um vantandi heimild at steingja dagstovnar vegna ráðleggingardagar |
| 13-08-2019 | 18/00090 | Klaga um langa viðgerðartíð og vantandi avgerð frá Heilsutrygd |
| 28-08-2019 | 19/00037 | Skriv til Landssjúkrahúsið um drúgva viðgerðartíð í sambandi við útvegan av serlæknaváttanum |
| 03-09-2019 | 18/00113 | Klaga um drúgva málsviðgerðartíð hjá Klaksvíkar kommunu av innlitsáheitan frá Kringvarpi Føroya |
| 24-10-2019 | 18/00125 | Klaga um burturvísing |
| 29-10-2019 | 19/00062 | Skriv til Almannaverkið viðv. klagu um vánaliga vegleiðing frá Almannaverkinum |
| 14-11-2019 | 19/00089 | Klaga um, hvørt byggiloyvi skal viðgerast eftir gomlu ella nýggju byggimálsreglunum |
| 19-11-2019 | 19/00027 | Klaga um málsviðgerðina hjá Tórshavnar kommunu í sambandi við útbjóðing av tøkniútgerð til nýggja musikkskúlan |
| 26-11-2019 | 19/00068 | Klaga um vantandi innlit í skjal hjá Løgmansskrivstovuni |
| 08-01-2020 | 19/00067 | Klaga um at Tórshavnar kommuna fremur mismun í sambandi við útlutan av grundstykkjum |